# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG

01
13



Pedagogfelagið 30 ár

## Fakfagnaðurin

## Árligi aðalfundurin

verður á Hotel Føroyum
16. mars



# Úr innihaldinum


Oddagrein 2

Tíðindi frá felagnum 4

Almennur pedagogiskur profilur 6

Sosialpedagogiskur profilur 12

Álitisfólkaskeið várið 2013 16

Altjóða kongress hjá felagsskapinum Aieji 17

Tínir møguleikar í ALS 18

Aðalfundarblað –

Ov nógv sukur ov lítið fullkorn og grønmeti 19

Sólareygað borðreiðir við heilsugóðum kosti 21

Almikið gagn av køkshjálpini 23

Hugburðurin er munandi broyttur 24

Foreldrini hava ábyrgdina 26

Fakfagnaðurin 28

Lettland ynskir dagstovnasamstarv 34


# ODDAGREIN

Maud Wang Hansen



## Góðu limir

Nú er longu eitt heilt ár, síðan verkfallið hjá Pedagogfelagnum var av. Tað er ótrúligt, sum tíðin rennur avstað – hinvegin er ikki enn komið á mál allastaðni við at fylgja semjuni. Fyrireikingartíðin stendur framvegis sum ein ógreidd krúlla – og tað er ymiskt úr einum stovni í annan, hvussu hetta málið er nátt. Pedagogfelagið hevur vent sær til KAF og heitt á tey um syrgja fyri, at kommunurnar fylgja sáttmálanum. Svarið frá KAF er, at tey arbeiða við einum uppskoti um, hvussu fyrireikingartíðin kann skipast. Tey ásanna, at tað ongantíð var ætlanin, at ein arbeiðsbólkur í Tórshavn skuldi vera avgerandi fyri, hvat tær ymisku kommunurnar gera fyri at seta fyrireikingartíðina í verk. Tað stendur til hvønn einstakan arbeiðsgevara, hvørja loysn tey finna, men KAF vil koma við einum vegleiðandi útspæli. Tað, sum harmar okkum mest, er, at KAF í brævi sínum leggur alt ov stóra ábyrgd á leiðararnar, fyri at málið skal verða rokkið. Tað eru jú ikki eru leiðararnir, sum áseta játtanina til stovnin – tað ger arbeiðsgevarin, kommunan. So uttan mun til, hvat leiðarin ynskir, so eru tað teir fíggjarligu karmarnir, sum eru avgerandi fyri, um pláss er fyri fyrireikingartíð, ella hvussu nógv fyrireikingartíð verður til hvørt einstakt starvsfólk. Pedagogfelagið bíðar nú eftir einum útspæli frá KAF hesum viðvíkjandi og átalar, at KAF leggur alla ábyrgdina á leiðararnar heldur enn at leggja ábyrgdina av, at sáttmálin verður hildin, har, sum hon hoyrir heima: hjá arbeiðsgevarunum.

Framtíðin hjá Pedagogblaðnum er ivasom í løtuni, og nevndin arbeiðir við at leggja um til eina nýggja heimasíðu í staðin fyri tað prentaða blaðið. Ætlanin við nýggju heimasíðuni er at skapa eina virkna og livandi heimasíðu, sum allir limir og onnur áhugað kunnu fáa gleði av. Ætlanin er ikki at gevast heilt við blaðnum, men tað verður framyvir gjørt á ein annan hátt, og nevndin ætlar í fyrstu syftu at brúka kreftirnar upp á nýggju heimasíðuna. Møguleiki verður hjá limum at fáa eitt intranet, soleiðis at tað gerst enn lættari at samskifta millum limir, nevnd og umsiting. Ein virkin heimasíða setur krøv til, at tilfar verður lagt út, og fari eg tí at heita á allar limir um at taka pennin, telduna ella teldilin í brúk og at luttaka virkið í at skapa eina livandi og áhugaverda heimasíðu. Okkum tørvar tykkara hjálp til, at hetta gerst veruleiki, og til at nýggja heimasíðan fer at vera livandi.

Árligi aðalfundurin verður á Hotel Føroyum tann 16. mars. Áhugin at stilla upp til nevndarval var ikki stórur hesaferð. Bert tvey uppskot vóru til tveir nevndarsessir, og tey bæði valevnini, sum bjóðaðu seg fram, eru sostatt vald í nevndina komandi trý árini. Í nevndini siga vit farvæl við Guðrun Eysturlíð og takka henni fyri tíðina, hon sat í nevndini. Vit bjóða Wenzel Olsen vælkomnum sum nýggjur nevndarlimur, og vit bjóða Elini N.W. Tausen vælkomnari til eitt framhaldandi samstarv. Nýggja nevndin fer sum eitt tað fyrsta undir at fyrireika sáttmálasamráðingarnar.

Vit síggjast á aðalfundinum tann 16. mars á Hotel Føroyum.

*Maud Wang Hansen*
*Forkvinna*



## Minningarorð

Tað vóru sorgarboð at fáa, nú Katrin Petersen ikki longur er ímillum okkum. Katrin, sum var fyrsta forkvinna í Pedagogfelagnum, arbeiddi til fyri heilt stuttari tíð síðan sum leiðari á Barna- og ungdómsdeildini í Tórshavnar kommunu, nú hon gavst vegna sjúku. Ein hugnalig og góð móttøka var hildin í posthúskjallaranum herfyri, har høvi var at takka Katrini fyri hennara trúgvu tænastu okkara faki, starvsfólkum, børnum og ungum at gagni. Á 30 ára fagnaðarveitsluni hjá Pedagogfelagnum í november í fjør helt Katrin eina stuttliga og hjartanemandi røðu, og eingin ivi er um, at hon altíð fer at standa sum ein varði og ein skínandi sól í hjørtunum hjá okkum í Pedagogfelagnum. Við hávirðing takki eg fyri, at mær untist at kenna Katrin Petersen.

# KOLOFON


**ÚTGEVARI:**
Føroya Pedagogfelag
Tlf. 357576 – Fax 357573
pedagog@pedagogfelag.fo – www. pedagogfelag.fo
**LAGT TIL RÆTTIS:** Sp/f Rit & Ráð
Tel. 229242 – www. ritrad.fo
**UMBRÓTINGING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ:**
Føroyaprent – www.foroyaprent.fo
**ÁBYRGDARBLAÐSTJÓRI:** Maud Wang Hansen
maud@pedagogfelag.fo
**BLAÐIÐ VERÐUR PRENTAÐ** í 2.500 eintøkum, kemur út fýra ferðir um ári, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis
**ONNUR ÁHUGAÐI** kunnu gerast haldarar fyri kr. 100,- árliga, við at seta seg í samband við felagið.
**LOYVT ER** at endurgeva tilfar úr blaðnum (*myndir undantiknar*) treytað av, at keldan verður upplýst.
**FORSÍÐUMYNDIR:** Jógvan Olsen *(ovara myndin)*
Bárður Lydersen *(niðara myndin)*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705





## NEVND



Maud Wang Hansen
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



Jógvan Philbrow
Næstformaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Elin N. W. Tausen
Nevndarlimur
elin@pedagogfelag.fo



Jannie Jacobsen
Nevndarlimur
jannie@pedagogfelag.fo



Guðrun Eysturlíð
Skrivari
gudrun@pedagogfelag.fo

## UMSITING



Maud Wang Hansen
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



Katrin Poulsen
Umsitingarleiðari
katrinp@pedagogfelag.fo



Bára Sólheim Guttesen
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo



Anna Dalsgarð
Bókhaldari
anna@pedagogfelag.fo

# Leiðararáðið

### Endamálið er:

- At lýsa støðuna og møguliga tørvin hjá stovnum og leiðarum yvirfyri nevndini.
- At koma við uppskotum um, hvussu nevndin og leiðarar í felag kunnu lyfta økið, bæði fakliga og fyrisitingarliga.

### Arbeiðsuppgávurnar eru:

- At bjóða ráðgeving til leiðarar.
- At savna og samskipa uppskot til nevndina, til dømis til sáttmálasamráðingar, leiðaraprofil og annað.
- At bjóða hjásitara.
- At skipa fyri árliga Landsleiðaradegnum.
- Fyri at vita, hvat rørir seg millum leiðarar, er tað av týdningi, at vit hoyra frá tykkum.

### Tel. nr. 287574

Telefonin er opin frá kl. 9.00-16.00 gerandisdagar.
Um vit ikki svara, vinaliga send eini sms boð og vit venda aftur til tín.
leidarin@pedagogfelag.fo

### Í leiðararáðnum eru:

Joan Midjord, forkvinna, Poula Ejdesgaard, skrivari, Nancy Poulsen Mirjam Johannesen og Hildur Hermansen



*Tjarnadeild 5*

# Skrivstovan fyribils flutt

Vegna ein oljuleka frá oljutanganum er skaði komin á kjallaran í Tungugøtu 1. Óvist er nær hetta verður liðugt umvælt. Vit eru tí flutt í Tjarnardeild 5. Lýst verður á heimasíðuni tá flutt verður aftur í felagshúsini.

# Páskafrí

Skrivstovan er stongd vegna páskafrí frá fríggjadegnum 22. mars til týsdagin 2. apríl.

# Kunning frá Pedagogfelagnum

Nevndin í Pedagogfelagnum hevur skipað fyri limafundum, har Rógvi Thomsen, námsfrøðiligur ráðgevi, hevur lagt fram námsfrøðiligar vangamyndirnar fyri limum felagsins. Fyrsti fundur var 18. januar í Ósaskúlanum í Klaksvík. Undirtøkan var sera góð, og fundurin gekk væl.

Seinni fundurin um sama evni var í Havn tann 5. februar, fitt av fólkið møtti til hendan fundin.

Triði og seinasti fundurin var fyri fullum húsi í Stórapakkhúsi í Vági 18. februar.

Nevndin hevur eisini skipað fyri fundi um „tey 6 ára gomlu í dagsins samfelag", sum var tann 29. januar 2013. Fundurin byrjaði við, at Jógvan Philbrow, næstformaður, legði fram, og aftaná varð lagt upp til kjak.

Pedagogfelagið fer í næstum undir at skipa fyri skeiðum fyri álitisfólkunum í felagnum. Álitisfólkini verða býtt upp í 6 bólkar. Katrin Poulsen, umsitingarleiðari, og Páll Nielsen, advokatur, fara at undirvísa á skeiðunum. Undirvíst verður í álitisfólkaskipanini, fyrisitingarlógini og starvsfólkarætti. Hvørt skeiðið verður í tveir dagar. Pláss er fyri umleið 20 álitisfólkum á hvørjum skeiði. Nærri skrá og kunning kann síggjast á heimasíðu felagsins.

Pedagogfelagið er við í einum arbeiðsbólki saman við umboðum frá Sernámi, Lønardeildini, Lærarafelagnum og Mentamálaráðnum. Endamálið hjá arbeiðsbólkinum er at greiða og lýsa starvsfólkaviðurskiftini hjá stuðlum í fólkaskúlanum, sum eru limir í Pedagogfelagnum. Tá ið bólkurin er liðugur við sítt tilmæli skal tað handast Mentamálaráðnum.








BANKNORDIK

# Persónlig røkt av tínari pensjón





## Nú bjóðar BankNordik Persónliga PensjónsRøkt

Persónlig PensjónsRøkt frá BankNordik er til tín, ið vil økja møguleikan fyri størri avkasti av tínari pensjónsuppsparing.

Okkara serfrøðingar seta tín pening í virðisbrøv og hava støðugt eftirlit við og røkta tínar íløgur. Íløgurnar verða lagaðar eftir tínum persónliga íløguprofili, og við Netbankanum hevur tú altíð yvirlit yvir tína pensjónsuppsparing.

Øll kunnu vera við. Lægsta upphædd fyri at stovna Persónliga PensjónsRøkt er 40.000 krónur.

Tosa við tín ráðgeva í dag um Persónliga PensjónsRøkt.

### 4 fyrimunir við Persónligari PensjónsRøkt

- ☑ Økir møguleikan fyri størri avkasti av tínari pensjónsuppsparing
- ☑ Verður lagað eftir tær og tínum íløguprofili
- ☑ Okkara serfrøðingar hava støðugt eftirlit við og røkta tínar íløgur
- ☑ Tú hevur altíð yvirlit

www.banknordik.fo

SENDISTOVAN

# Almennur pedagogiskur profilur

Orð: Rógvi Thomsen
Myndir: Tórfinn Smith

Pedagogfakið og pedagogfatanin eru í broyting. Tað er tað ikki nakað nýtt í. Hetta er fakøki, ið er ungt, og sum alla tíðina hevur verið í broyting. Tann gongdin, ið er í løtuni, er: at fakið er farið frá at vera næstan eitt umsorganarfak, til at fakið er við gerast partur av eini vitanarfakligari hugsan – øll talan um málmenning, neyv mál og nær børnini skulu í skúla – benda tann vegin.

Kanska er tað rætt, kanska er tað ikki rætt. Men grundleggjandi tykist tað beint nú vera soleiðis, at aðrir fakbólkar enn pedagogarnir seta dagsskránna á pedagogiska økinum.

Tað bendir so aftur á, at sjálv fatanin av, hvat pedagogar duga, er ov veik hjá pedagogunum sjálvum. Hetta hevur havt við sær, at stór pedagogfaklig øki, sum t.d. sosialpedagogiska økið, hevur verið fyri stórum missi av lendi.

Tað sama er um at henda við teimum 6-7 ára gomlu, tey verða drigin inn í eina vitanargrundaða pedagogiska fatan, ið leggur dent á skúlagongd, heldur enn á hugtakið læring. Skal tað undirvísast, so hoyrir tað heima á skúlunum, meðan læring er ein breið tilgongd, ið fer fram í øllum lívsins viðurskiftum, t.e. at læring er ein stórur partur av gerandisdegnum á dagstovnunum, men ikki beinleiðis skipað undirvísing.

## Pedagogisk faklig vitan

Tann serstaka pedagogfakliga vitanin og „kunnanin“, tað, sum ger tann góða pedagogin, er ein serstøk faklig vitan, ið bert pedagogar hava. Skal pedagogfakliga arbeiðsøkið tryggjast, so hevur tað alstóran týdning, at pedagogarnir sjálvir seta orð á, hvør hevur hesa vitan, hvat hon fatar um, og á hvørjum arbeiðsøkjum, hon er tann ráðandi vitanin, ið er neyðug fyri at arbeiða á hesum økjum og menna hesi øki.

Men tað er ikki ókent, at millum pedagogar er ofta stórur ótryggleiki um, hvat pedagogfakligheitin er, og løgið nokk, hvør hevur hana. Pedagogar gerast ótryggir um sína egnu fakligheit.

Søguliga hevur tað nokk sína uppruna í, at tað upprunaliga er eitt umsorganarfak – og at geva umsorgan, varð hildið, at øll dugdu. Men tann partin kunnu vit ikki brúka til nakað, nú, tá ið fakið er vorðið eitt kjarnufak í nútíðar vitanarsamfelagnum. Á mangan hátt, tað kittið, ið heldur samfelagnum saman.

Men nógv av hugburðinum frá umsorganartíðarskeiðnum hongur enn við – bæði hjá myndugleikum, fólki flest og hjá nógvum pedagogum sjálvum. Tað er hetta, ið skal gerast upp við, og at royna at seta orð á: *Hvør er tann professionella pedagogfakligheitin í tí seinmodernaða samfelagnum?* Ella meira einfalt: *Hvat duga pedagogar, ið aðrir fakbólkar ikki duga?*

Neyv mál fyri einstaka barnið og læriætlanir hella oftani tann vegin, at barnið gerst objekt, heldur enn subjekt, um vit ikki ansa væl eftir, at endamálið við pedagogikkinum er menningin av øllum barninum. Námsætlanir eiga at vera rúmligar og geva pláss til tað einstaka barnið og barnabólkarnar, við øllum teirra ótroyttu møguleikum.

## Børn og ung – samtíðarfatan

Børn og ung nú á døgum ferðast í gerandisdegi sínum heimkunnug á so nógvum ymiskum sosialum leikpallum. Leikpallar, ið allir seta nýggj krøv, geva nýggjar avbjóðingar, og seta krøv um nýggjar sosialar førleikar. Pedagogiska avbjóðingin er, hvussu vit best geva børnum og ungum møguleikar at menna atburð og førleikar, sum ger, at tey kunnu liva og kompetent handfara lívsumstøður í einum ókendum samfelag, í eini framtíð, sum als ikki er til enn.

Tí hevur tað eisini slíkan týdning, at pedagogiska virksemið tekur støði í samtíðini, samstundis sum tað ikki sleppir sínum uppruna, men heldur ikki noyðir upprunan inn á børnini og tey ungu, men fatar hann sum ein part av og fortreyt fyri nútíðini og framtíðini.

Støðan er tann, at tað, sum børn og ung nú á døgum fáast við, á avgerandi økjum er heilt øðrvísi, enn tað, børn og ung fyri bara einum ella tveimum ættarliðum síðani tókust við. Tað vil siga, at barndómur og ungdómur í Føroyum verður livdur á ein heilt annan hátt, enn tá ið flestu ástøðini um menningina av børnum og ungum vórðu gjørd. Og hóast tað, verða hesi ástøði í stóran mun enn brúkt fyri at skilja børn og ung, og hvussu vit eru um tey.

Um vit seta ov trong, miðstýrd mál í námsætlanum – bæði fyri einstaklingar og bólkar av børnum og ungum – er vandi fyri, at børnini og tey ungu verða hildin føst í eini ótíðarsamkendari støðu, bæði pedagogiskt, psykologiskt og samfelagsligt. Tí at broytingarnar oftast fara fram í refleksæraðum handlingum á stovnunum, og ikki í námsætlanum.

## Gerandisroyndir

Pedagogiskt arbeiði er eyðkent av, at pedagogiskt starvsfólk handlar við støði í kropsligtgjørdum royndum, um tað tey gera – tey gera tað bara. Tað verður ikki altíð hugsað so gjølla um tær gerandisroyndir ella gerandismedvitið, ið er aftan fyri pedagogisku handlingarnar. Tað verður ikki reflekterað um, hvørjum royndirnar eru grundaðar í. Royndirnar eru samansettar av bakstøðinum hjá tí einstaka menniskjanum, egnum royndum og teoretiskum fatanum. Hetta verður ofta kallað kropsliggjørdar royndir – tí tær ikki altíð eru tilvitaðar. Broytingar krevja umhugsni, at seta seg sjálvan og sínar vanahugsanir í spæl. Hetta krevur umhugsni – refleksión, pedagogiska hugsan, virðishugsan og teoretiska fatan. Men praksis er ikki í síni grund teoretisk, men teoriin um praksis er teoretisk, grundað í praksis.



*Rógvi Thomsen. Cand.ped. og námsfrøðiligur ráðgevi. Rógvi hevur útbúgvið meira enn 600 námsfrøðingar á Námsfrøðiligu útbúgvingini og er tí mettur royndasti serfrøðingur innan námsfrøðiliga fakið*

## Paradigmuskiftið – og avleiðingar av tí

Seinastu 10 - 20 árini er eitt paradigumskifti farið fram í okkara máta at síggja barnið, hetta í mun til nýggjar útviklingspsykologiskar fatanir og nýggjar kanningar av menningini hjá smábørnum og relatiónsgransking. Tað, sum hevur verið trupulleikin, er, at nýggja paradigmið hevur havt eina heldur trupla leið inn í vanliga pedagogiska gerandispraksis. Hetta hevur nakað at gera við bæði gerandispraksis, men eisini við, hvussu trupult tað er, at broyta kropsliggjørda gerandismedvitið.

Heilt einfalt ber til at siga, at kjarnin í paradigmuskiftinum er, at børn verða fødd við sosialum førleikum, og teimum tørvar sosialar relatiónir fyri at hesir viðføddu eginleikar kunnu mennast. Hetta merkir eisini, at tey frá byrjan, hava tørv á at kenna seg virðismett og avhildin í relatiónini við teirra næstu vaksnu, og at relatiónin gongur báðar vegir. Tað er ikki bara tann vaksni, ið gevur barninum nakað, barnið gevur eisini nakað aftur, ið ávirkar relatiónina, ið frá byrjanini er ein subjekt-subjekt relatión. Tørvurin á at kenna seg virðismett í relatiónini við tey næstu vaksnu, ger, at barnið samstarvar kompetent við alla vaksnaatferð, um tað er konstruktivt ella destruktivt fyri egna lívið hjá barninum. Samstarvið við destruktiva vaksnaatferð hevur avleiðingar fyri integritetin hjá barninum, tí at barnið í hesi støðu má fara longri, enn tað hevur aldur til og hvar tað er statt í menningini. Tá ið børn ella onnur menniskju skulu fara langt um egin mørk fyri at kenna seg virðismett í relatiónini, fylgir altíð eitt ávíst stikni og mishugur við – barnið ella menniskjað kemur í ójavnvág av hesum marknabroti. Henda ótýdliga kensla gevur seg ofta aftur til kennar í atburðinum.

Stórir partar av teimum trupulleikum, ið síggjast aftur í atburði, konsentratión og uppmerksemi, eru sostatt rótfestir í teimum relatiónum, barnið er partur av. Tær næru relatiónirnar til foreldrini, ella til teirra, ið eru í foreldranna stað, eru tær relatiónir, ið hava størstan týdning. Hetta hevur leingi verið viðurkent av pedagogum. Truplari sær út til vera at taka til sín, at eisini relatiónin hjá barninum við pedagogin hevur stóran týdning. Tá ið trupulleikar taka seg upp við einum barni, verður øgiliga oftani víst til atferðina hjá barninum, og ikki til relatiónina millum fakpersónin og barnið.

## Narrativur pedagogikkur og viðurkennandi pedagogisk praksis

Tað eru tvey heilt avgerandi temu, ið eyðkenna narrativan pedagogikk. Tað fyrsta er, at pedagogarnir granska í, hvat teir sjálvir kenna, uppliva og hugsa um eitt ávíst tema, og leita eftir tilfeingi í mótganginum. Fatanir, virði og sjálvfatan verður dekonstrueráð, og orð verða sett á, áðrenn narrativi pedagogikkurin verður brúktur í mun til børnini. Tað næsta er, at pedagogarnir við hesum bakstøði, har nýggir tankar eru vaktir, har forvitni og sannur áhugi kemur fram, seta orð á eina røð av spurningum, ið ger pedagogarnar førar fyri at lurta eftir børnunum, heldur enn at tolka upplivingarnar hjá børnunum. Samstundis letur hetta upp fyri førleikanum og evnunum hjá pedagoginum at raka við og brúka tilfeingið hjá børnunum. Henda tilfeingishugsan stuðlar viðurkennandi tilgongdum, bæði í bólkum og hjá tí einstaka.

At sameina refleksiónir yvir persónligar fatanir og upplivingar – persónliga pedagogiska menning, við handlingar og metodir, geva rúm fyri einum viðurkennandi pedagogikki, ið gevur børnunum og teimum ungu mæli, har refektión og handling gevur pláss fyri nýggjum pedagogiskum fatanum, pedagogiskum endamálum, handliplanum og metodum, ið gerast partar av praktiska gerandisveruleikanum, verða innhugsaði í pedagogiska gerandisdagin og harvið gerst partur av veruleikanum.

Í narrativum pedagogikki er sjóneykan sett á fakliga og persónliga menning – at vit læra allatíðina. Tað er umráðandi allatíðina at læra seg at hugsa: Hvat kann eg broyta? Er pedagogiska praksisin hjá mær tann skilabesta í mun til børnini, t.d. um børnini ikki trívast? Tað hevur týdning, at pedagogurin ber seg aktivt at í mun til persónligar fatanir og virði, og er til reiðar at seta hesi í spæl í lærugongdum.

## Málbólkar fyri pedagogiskum arbeiði

- Menniskju í øllum aldri úr vøggu í grøv
- Alt lívskeiðið ella partar av lívsskeiðinum

(barnagarðar, frítíðarskúlar, ungdómshús, røktarheim o.s.fr.)

- Menniskju á øllum støði – frá vælvirkandi børnum og ungum, til børn og ung við trupulleikum av atferð, av menningarógvi, tarni ella øðrum.
- Menniskju á veg inn í samfelagið – uppaling av smábørnum, dannilsi, menning, læring og sosialisering í barna- og ungdómsárunum

Pedagogiska arbeiðið tekur støði í teimum virðum, samfelagið er grundað á, og á tey mál og ætlanir, samfelagið setir fyri børnini – og hetta sæst aftur í endamálsorðingini í lógini fyri dagstovnaøkið. Grundleggjandi er pedagogarbeiðið eitt dannilsisarbeiði, at danna til lívið. Pegagogiska arbeiðið er grundað á virði, sum:

- andsfrælsi, tollyndi, javnvirði, javnstøðu og fólkaræði
- innlivan, samavgerð og samábyrgd
- margfeldi og talufrælsi
- sosiala ábyrgd, solidaritet og fyribyrging

Áherðslan á dannandi partin av pedagogarbeiðinum, hevur stóran týdning fyri, hvussu børnini og tey ungu fara at verða, handla og gerast partur av samfelagnum, hvussu tey aktivt, medvitin og sjálvstøðugt taka ræði á egnum lívi og mennast, samstundis við at tey gerast virknir samfelagsborgarar.

Pedagogar hava ábyrgd av at skapa karmar og fortreytir fyri virksemi, ið tekur støði í fortreytum og tørvi hjá børnum og ungum, áhuga og málbúnar, hinvegin er uppgávan eisini at tryggja støðugu menningina hjá barninum og tí unga.

Fyribyrging er ein týðandi pedagogisk uppgáva. Verður stuðlað tíðliga – og eitt virkið pedagogiskt fyribyrgingararbeiði skipað – slepst ofta undan nógvum av teimum trupulleikum hjá børnum og ungum, ið kunnu taka seg upp seinni í lívinum. Serstaka fyribyrgjandi virknið tryggjar børnum og ungum við tørvi á stuðli sama møguleika fyri menning sum onnur børn og ung. Pedagogiska uppgávan her tryggjar eitt fólkaræðisligt og solidariskt menniskjasýn.

## Faketikkurin

Tá ið vit skulu seta mál fyri arbeiði okkara við børnum, ungum og menniskjum annars, eru vit noydd til at gera okkum greitt, hvør etisk fatan ella mannasýni liggur aftanfyri, tí tað treytar okkara mál og máta at handla uppá. Tað er ikki fyrr enn vit fara at tosa um og seta mál í mun til faketikkin, vit síggja týdningin av honum. Her byrja ósemjurnar og kjakið, her koma etisku virðini hjá okkum fram. Faketisku reglurnar og fatanirnar loysa ikki trupulleikarnar, men seta ljós á teir.

Faketikkurin snýr seg um handlingarnar hjá fakpersóninum, tá ið hesin ger fakliga arbeiði sítt.

Etiski parturin og fatanin er partur av okkara handling, hvat vit velja ella hvat vit ikki velja. Hesi viðurskifti eru eisini viðvirkandi til, at tað er lætt ikki at leggja tað til merkis, tí tey eru so sjálvsøgd. Hetta krevur serstaka reflektión og umhugsni. Óttin fyri, at faketikkurin gerst stirvin, er ikki serliga grundaður, tí at okkara persónur saman við fakligu vitanini eru týdningarmesta amboðið í fakliga etikkinum, men tað krevur sjálvsmenning.



Límafundur í Suðuroy

## Etikkur, mannasýn ella virði

- Barnið og tann ungi eru unikkir, javnsettir persónar, við rætti til virðing fyri sínum persónliga integriteti.
- Barnið og tann ungi hevur rætt til sjálvræði yvir sínum egna lívi
- Barnið og tann ungi hevur rætt til umsorgan
- Solidaritetur og meiningsfult pláss til øll
- Barnið og tann ungi hava virði í sær sjálvum
- Barnið og tann ungi hava rætt til at verða stuðlað í at útrykkja sítt egna perspektiv og egnan tørv, soleiðis, at hesi verða vird í fult mát
- Barnið og tann ungi skulu hava møguleika fyri at menna og útvikla ressursurnar og potentialini í fult mát
- Barnið og tann ungi skulu hava avbjóðingar, ið standa í rímiligt mát við, hvar tey eru í lívinum

Samfelagsliga skyldan er at tryggja mannsømiligar karmar og umstøður, meðan pedagogiska arbeiðstreytin er at skapa meining hjá barninum og tí unga – at samskiftið gerst komplimentert. So vítt gjørligt at tryggja sjálvsavgerðarrættin, men eisini at viðurkenna, at professionella relatiónin, pedagogur-barn/ungur – ofta hevur við sær eina assymetriska maktrelatión, har vandi er fyri, at missa málið av sýni, málið, ið er at stuðla barninum og tí unga í at skapa meining í egnum lívi. Vit sleppa ikki undan maktini, tí hon er har, krógvað ella beinleiðis, men professionella uppgávan hjá pedagoginum er at síggja og viðurkenna sær maktina, og aktivt at taka støðu til hana.

Pedagogiska prosessin verður at skapa felags meiningargrundarlag. Alt snýr seg um samhandling, t.e. pedagogiska arbeiðið verður avgjørt í møtinum millum pedagogin og barnið/tann unga, interaktiónin og relatiónin verður konstruerað í samhandlingini og samforstáilsinum, í sjálvum møtinum; men tá hava teir karmar, ið samfelagsliga fatanin skapar, eisini týdning, tí teir eru partar av og eru við til at konstruera veruleikan – og harvið pedagogiska rúmið, samstundis við at samfelagsliga fatanin er konstituerandi fyri interaktiónina og relatiónina, tað er ein samhandling millum samfelag og pedagogiskan veruleika.

Virðingin, grundað í mannarættindasáttmálanum, hevur í hesum sambandi avgerandi týdning og ávirkan á, at moralska og etiska samskiftið eydnast.

## Stuðul í lívsdygdini

Í arbeiði sínum skal pedagogurin skapa umstøður fyri lívsdygdini hjá tí einstaka, samstundis sum at pedagogurin stuðlar, hjálpir og vegleiðir barninum og tí unga á lívsleiðini og í at koma víðari:

- Barnagarðsbarnið, ið skal í skúla
- Tann ungi, ið skal velja útbúgving

## Yvirskipaðir pedagogiskir førleikar

- Seta í verk pedagogiskar handlingar
- Fyriskipan av og refleksión um pedagogiskt arbeiði
- Samskifti um menningina av pedagogiska arbeiðinum – bæði í mun til egnan fakbólk og tvørfakliga
- *Vitan um pedagogikk*

## Pedagogfakligheitin – grundkompetansur:

- Kjarnin í pedagogfakligheitini er førleikin og evnini at praktisera „tað persónliga", „tað sosiala", „tað mentunarliga" og „tær sínámillum menniskjansligu relatiónirnar", hetta er sjálvur kjarnin í virkseminum hjá pedagoginum og tískil eisini grundarlagið undir ástøðiliga lesnaðinum og útbúgvingini.
- *Tað eru relatiónsførleikarnir ella samskiftisførleikarnir, ið eru eyðkennið hjá pedagoginum.*

## Relatiónir og virði

Hesi mið leiða til relatiónir, ið virða integritetin hjá tí einstaka barninum og unga, og sjálvsavgerðarrætt teirra, samstundis við, at støði verður tikið í tørvi og intentiónum hjá barninum og tí unga. Hvat eyðkennir eina stuðlandi relatión við barnið og tann unga?

- Innlivan við aktivt at lurta eftir barninum/børnunum og tí unga.
- Innlivan við at spyrja til intentiónirnar (tað, barnið og tann ungi ætlar) hjá barninum/børnunum og tí unga.
- Innlivan við handla í mun til intentiónirnar (tað, barnið og tann ungi ætlar) hjá barninum/børnunum og tí unga.
- Tann vaksni stuðlar upp undir upplivingarnar hjá barninum/børnunum og tí unga.
- Tann vaksni stuðlar intentiónunum (tað, barnið ætlar hjá barninum/børnunum) og tí unga.
- Tann vaksni virðir tað, ið hevur týdning fyri barnið/børnini og tann unga.

## Pedagogiskir førleikar og kunnleikar

- Skapa professionellar relatiónir við barnið og tann unga, ið tekur fyrilit fyri samleika og fortreytum hjá tí einstaka
- Skipa fyri og seta í verk tiltøk/aktivitetir, ið fær barnið og tann unga til at uppliva pedagogisku prosessina sum meiningsgevandi, áhugaverda og hugfangandi
- Leggja til rættis, seta í gongd, gjøgnumføra, reflektera yvir, dokumentera og evaluera eina pedagogisk gongd
- Greiða frá og grundgeva fyri vali av máli og metodum
- Analysera og reflektera yvir sambandið millum pedagogisk mál og mið, seta tað í samband við egna praksis – og praksis hjá øðrum – við tí í huga, at meta um, um gongdin var nóg góð ella um okkurt skal broytast
- Vegleiða og stuðla foreldrum og avvarðandi at børnum og ungum
- Arbeiða í toymi saman við øðrum fakbólkum og í mun til myndugleikarnar

## Pedagogisk starvsfólk og relatiónin

Vit nærkast nú eini pedagogiskari fatan, sum fær okkum at leggja dent á, at handlingin hjá pedagogiska starvsfólkinum, saman við og í mun til onnur menniskju, ikki frammanundan er skrivað niður í endamálsorðingina fyri tann einstaka stovnin ella pedagogisku skipanina ella arbeiðsháttin á staðnum. Handlingin gevur bert meining í møtinum millum menniskjað og pedagogiska starvsfólkið.

Við teirri góðu pedagogisku relatiónin fyri eyga, ber tá til „refleksivt" at fara aftur um ta góðu pedagogisku relatiónina – hvat er góð praksis – har bæði meining og týdningur í arbeiðinum verður til.

Relatiónin endurspeglar sostatt eina pedagogiska praksis, har tær einstøku handlingarnar geva meining og týdning fyri pedagogiska starvsfólkið sjálvt.

## Ábyrgdin av relatiónini

Báðir partar, ið eru í relatiónini, vara av henni, men pedagogurin hevur sum fakpersónur og vaksin ta yvirskipaðu ábyrgdina av kvalitetinum av relatiónini.

Innihaldið – ella kvaliteturin av relatiónini er m.a lýst í, hvat stovnurin stendur fyri, virðisgrundarlagi og menningarætlan, t.d. líkavirði, virðing og virðing fyri ymiskleikanum, álit, opinleika og ábyrgdarkenslu.

## Persónligar og relationellar kompetansur

Skiftið í pedagogisku fatanini til at dentur verður lagdur á relatiónina við barnið og tann unga, hevur við sær, at menniskjasýn, bakstøði/habitus, moralur og etikkur verður medspælari í pedagogisku gongdini.

## Viðurkenning og viðurkennandi

Viðurkennandi pedagogikkur er tætt knýttur at, at tey vaksnu eisini tora at ansa eftir og menna sínar relationellu kompetansur.

Heilin hjá menniskjanum og harvið økkara vesin og veran, er skipað soleiðis, at vit læra best, trívast best og mennast best í einum umhvørvi merkt av viðurkenning. Viðurkenningin ger, at vit kenna grundleggjandi tryggleika og harvið upplivingina av vælveru, kreativiteti og dirvi til at fara í gongd við nýggjar avbjóðingar.

Viðurkenning styrkir upplivingina av at kenna seg sæddan, hoyrdan og fataðan, og sostatt eginleikan at kunna merkja seg sjálvan.

## Tað lítla føroyska umhvørvið. Bæði sum tilfeingi og sum vansi Mentanin

Í mentanini eru vit einsamøll, tað eru bara vit sjálvi, ið kunnu bera okkara mentan og felagskapurin er í mentanini, hóast vit eru ein partur av globala heiminum. Tað globala er so nær, at tað næstan er lokalt, tí kunnu vit kalla tað glokalt. Glokaliseringin merkir, hvussu vit taka tað globala til okkara, og hvussu tað lokala aftur ávirkar tað globala, hvussu tað sæst aftur í okkara fatan av gerandisdegnum og í okkara máta at vera uppá.

Hyggja vit at føroyska veruleikanum, so tykist tað, sum alt ov mong lata eyguni aftur fyri hesum veruleika, og teim víttfevnandi broytingum, hetta hevur við sær. Ofta tykjast virðissetingarnar í samfelagnum í mongum førum at grunda seg á eina ósamtíðarkenda fatan av, hvar Føroyar eru í verðinsmeldrinum. Virðisfatanir og hugsanir í Føroyum tykjast ofta at hava røtur í einum

samfelag, sum langt síðani er farið, um tað yvirhøvur *hevur* verið til – uttan í huganum á fólki. Men tað er eyðvitað eisini veruligt, men akkurát tí ein *hugmynd*.

Relatiónin og viðurkenningin eru ikki bara ein umsorganaruppgáva, men eisini ein pedagogisk dannilsisuppgáva, umsorganin fyri at verða til – sum demokratisk menniskja í mentanini, at blíva føroyingur í øllum sínum margfeldi av fatanum og mentanum

Tað, sum hevur týdning, er, at tað ikki bara er ein mentan – ein føroysk mentan – men fleiri. Hvussu vit eru í mentanini, er ofta eitt val í mun til, hvørjum vit møta. Hjá barninum og tí unga er tað í fyrsta umfari ein lívstreyt, men seinni eitt val millum nógvar mentanir. Ein pedagogisk uppgáva er at fyrireika barnið til hetta val.

Vit mugu góðtaka, at mentanin er grundað í ymiskleikanum, ikki minst ymiskleikanum hjá foreldrunum og í bakstøðinum hjá barninum og tí unga.

## Sosialur mismunur. Mattheus-effektin: *„Tí at tann, sum hevur, skal verða givið" ella „slagið"*

Tað er eitt slag av at gera mismun á børnum, ið vit hava lyndi til ikki at síggja. Tað er sosiali mismunurin. At børn verða viðfarin ymiskt, er ikki ein trupulleiki í sjálvum sær, tvørturímóti. Pedagogiska endamálið er júst at taka støði í tí einstaka barninum, í tess fjølbroytni, ið er ein metafora fyri, at ynskiligt er at møta børnunum ymiskt. Trupulleikin tekur seg ikki upp, fyrrenn nøkur børn á stovni vera viðfarin í mun til sosiala bakgrund ella familjuupphav teirra. Fyribrigdið verður, við at vísa til Mattheusevangeliið, ofta kallað, „Mattheus-effektin", og verður tá meint við, „at tann, sum hevur, honum skal verða givið". Tað, ið víst verður á, er, at summi børn fáa nakað jaligt burtur úr at vera á dagstovni, meðan onnur børn fáa eina neiliga uppliving, í mun til hvørji tey eru, hesi seinnu børnini hava ofta verri kor á stovninum enn onnur børn.

Í einum lítlum samfelag sum tí føroyska, ber eisini til at tosa um „slagið", tí at slagið ofta eisini er ein partur av kropsliggjørdu gerandisroyndunum hjá pedagogiska starvsfólkinum, tey so at siga endurskapa slagið í hugaheiminum og handlingum, og eru harvið við til at varðveita slagið, sum slagið. Tað er ikki soleiðis, at hetta fer medvitið fram á stovnunum. Mattheus–effektin merkir, at barnið hevur royndirnar úr familjuni við sær á stovnin, og har møtir vaksnum, ið stuðla undir við teirra forroyndum, forforstáilsi og erfarna forstáilsi, pedagogiska starvsfolkið gevur afturljóð við at halda barnið fastlæst í støðuni.

Sosiali mismunurin sæst aftur, tá ið pedagogurin sosialt stigmatiserar einstaka barnið, fram um at síggja menniskjað í barninum. Barnið verður møtt við nøkrum frammanundan gjørdum meiningum og royndum, og hetta ávirkar so aftur, hvussu pedagogarnir møta og stuðla tí einstaka barninum. Tað slepst ikki undan, at pedagogar eru ein partur av uppalingini, tí slepst heldur ikki undan at børnini av og á verða viðfarin óhóskandi og órættvíst, at munur verður gjørdur á teimum. Men professionelt pedagogiskt arbeiði er at vera greiður yvir hesi viðurskifti, sjónliggera tey og seta orð á tey, og ikki at síggja barnið sum ein trupulleika, genta ella drongur, men eitt menniskja í illum og góðum.

Fyrimunurin við tí lítla samfelagnum er nærleikin. Vansin, at nærleikin kann gerast eitt haft.

## Dagstovnurin Virðisgrundarlag

Børnini verða viðurkend sum unikkir persónar, har hvør einstakur hevur sínar egnu fortreytir. Tey vaksnu taka børnini, sum tey eru – í pedagogikkinum verður støði tikið í tørvi teirra og í sterku síðum teirra.

Børnini verða sædd sum virkin í egnari menning og læru. Tey vaksnu lurta eftir børnunum og geva rúm fyri, at tey hava medávirkan, soleiðis, at børnini sjálvi kunnu skipa gerandisdag teirra og tað, tey fegin vilja.

Barnsins menning verður sædd sum ein heild, har tann sosiali parturin, tann intellektuelli parturin, tann kensluligi parturin og tann kropsligi parturin eru tætt samantvinnaðir. Tann vaksni gevur rúm fyri nógvum spæli og øðrum aktivitetum, ið styrkja allar síður av menning barnsins. Hetta eru avbjóðingar, ið hugfanga og geva meining fyri børnini.

Barnanna persónliga og sosiala menning verður høgt raðfest. Tey vaksnu seta tær næru relatiónirnar í fremstu røð og stuðla upp undir sosialu samveruna hjá børnunum, við tí fyri eyga, at barnið kennir seg sjálvt og at barninum dámar seg sjálvt – og fær álit á, at tað megnar avbjóðingarnar í umhvørvinum hjá sær og gerst virkin partur av felagsskapinum.

## Mannasýni

Børnini verða fatað sum handlandi persónar við vitan, dreymum, hugsanum og meiningum um lívið og framtíðina. Tey skulu takast við upp á ráð, verða tikin uppí og fáa týðandi royndir við at hava ávirkan á egið lív. Foreldrini eru tey týdningarmiklastu vaksnu hjá børnunum, og hava tí høvuðsábyrgdina av lívi, menning og uppvøkstri teirra

## Pedagogikkur

- At skapa eitt umhvørvi merkt av umsorgan og tryggleika, har ymiskleikin hjá børnunum verður virdur.
- At taka støði í møguleikum og tilfeinginum hjá børnunum sum besta grundstøðið undir menning.
- At stuðla upp undir forvitnið og ríkidømið upp á hugskot og kreativitet, so børnini fáa hug til lívið og hug at læra.
- At taka børnini við í demokratisku gongdirnar og avgerðirnar, so tey læra at taka á seg ábyrgd av felagsskapinum og sær sjálvum – við støði í teirra fortreytum.
- Virkið at taka foreldrini við í menningina av børnunum.

## Paradigmuskiftið í barnasýninum sum grundarlag undir dagstovnaarbeiðinum

- Børn verða fødd við sosialum kompetansum og hava tørv á relatiónum við onnur – børn og vaksin – fyri at kunna mennast
- Barnið hevur tørv á at kenna seg virðismett – hetta er ikki ein objekt-subjekt relatión, men ein *subjekt-subjekt* relatión
- Nógv av tí, vit hava hildið, stavar frá íbygdum eginleikum hjá barninum, kemst av teimum relatiónum tað er í, og hevur verið í.

## Førleikar hjá starvsfólkinum á stovninum

Í teirri tíð, dagstovnar hava verið til, er vorðið skift millum ymiskar pedagogiskar fatanir, vaksnastýring, barnastýring, sjálvlæring ella vaksnastuðlaða læring. Í løtuni tykist tað, sum er fatanin onkrastaðni mitt ímillum. Barnið verður sætt sum aktivt, viðskapandi og kompetent í egna gerandisdegi sínum. Samstundis við at menning, læring og dannilsi fer fram í samspæli og samljóði við umsorganarfull, empatisk og engagerað vaksin og børn.

Dagstovnurin tekur sær í fyrsta umfari av trimum økjum:

- tað skal vera eitt gott stað at vera hjá børnunum
- tað er eitt stað, har barnið lærir at bera seg í einum sosialum og mentunarligum margfeldi – samfelagnum
- tað er á dagstovninum, barnið lærir at vera virkið í sínum egna lívi, við rættindum og skyldum

Dagstovnurin verður skilmerktur sum eitt demokratiskt prosjekt, har høvuðsuppgávan hjá pedagoginum er at reflektera yvir egna praksis, síggja børnini í barnahædd og alla tíðina endurskipa og menna nýggjar møguleikar at praktisera fólkaræðið.

## Samlaða pedagogiska uppgávan fevnir um

- uppaling
- menning
- læring og dannilsi
- *Hetta ber í sær, at pedagogiska starvsfólkið sjálvstøðugt og saman við øðrum skal stuðla og stimbra*
- emotionellu
- sosialu
- kognitivu
- motorisku og málsligu menningina og læringina hjá barninum

Fyri at røkka hesum skal pedagogurin kunna:

- Arbeiða í kollegialum toymum
- Duga at samstarva við, leiðbeina, vegleiða og kveikja hjálparfólk og lesandi
- Duga at samstarva tvørfakligt við nógvar bólkar
- Hava kunnleika til onnur fagøki, fakmál og etikk
- Duga at samstarva við foreldur og avvarðandi
- Duga at samskifta á ymiskum støði
- Duga og kenna til konfliktloysnir
- Duga at analysera og fara inn í sosialar „støður" við støði í vitan og royndum í ymsum sosialum og psykiskt treytaðum problematikkum
- Duga at ráðgeva og vegleiða alment

Allar hesar uppgávur gera, at pedagogurin hevur ábyrgd av at menna eitt pedagogiskt rúm, ið er eyðkent av:

- Professionaliteti
- Áhuga
- Engagementi
- Stuðli
- Vegleiðing
- Tryggleika
- Umsorgan

Eitt rúm, har barnið kann gera sær jaligar royndir við lívinum

## Frítíðarskúlar

Tað eru fáar royndir gjørdar at lýsa serstaka pedagogikkin í frítíðarskúlum. Tað ber til at eyðlýsa pedagogikkin soleiðis: almennur pedagogikkur, sosialpedagogikkur, relatiónspedagogikkur – og didaktikkur og læring.

Almenni pedagogikkurin, sosialpedagogikkurin og relatiónspædagogikkurin snúgva seg um umsorganina fyri tí einstaka barninum, relatiónirnar hjá børnunum við hvørt annað og við tey vaksnu, og børn við serligum tørvi. Pedagogiska arbeiðið í frítíðarskúlunum er skipað í mun til relatiónirnar hjá barnabólkinum, og hvussu tað einstaka barnið kann stuðlast í at bera seg í sosiala felagsskapinum. Uppgávan er at stuðla børnunum í at mennast sum sosialur persónur og at megna egið lív.

Við frítíðarpedagogikki verður hugsað í virknisskipaðum pedagogikki. Her verður dentur lagdur á sjálvvaldar aktivitetir og luttøku av egnum huga. Stórur partur av pedagogisku fatanini her er sjálvsavgerðarrættur og viðavgerðarrættur í mun til aktivitetir og spæl.

Didaktikur og læring eru ikki tað, ið hevur verið fremst á pedagogiska fakøkinum. Læring er her fatað sum meira enn fakskipað undirvísing, tvs sum læring í eini breiðari merking; sum dannilsið ella læringin, ið fer fram, tá ið børnini uppliva saman við hvørjum øðrum í spæli ella saman við tí vaksna. Oftast eru pedagogar meira upptiknir av prosessini í einum aktiviteti, ella av, um vit gera tað, vit siga, at vit gera. Einki ilt um tað. Men í frítíðarskúlanum er allarhelst neyðugt at fara meira málrættað til verka, uttan at málið gerst innihaldið í sær sjálvum. Pedagogurin eigur í størri mun at spyrja: Hvat er málið fyri børnini? T.e. hvat skulu børnini hava burtur *úr tí*, tey gera, hvat skulu børnini læra av tí, vit gera saman við teimum? Er tann neyðuga refleksiónin til staðar um mál og endamál við pedagogiska arbeiðinum, eigur at sleppast undan, at tað gerst eitt objekt-subjekt forhold, men at vit varðveita subjekt-subjekt fatanina, eisini í frítíðarskúlapedagogikkinum.

## Tann innantómi gerandisdagurin

Av tí at pedagogisku uppgávurnar eru so margfaldar og avbjóðingarnar so fjølbroyttar, so er lætt at fara eftir løttum loysnum. Einfaldar pedagogiskar loysnir, ofta við støði í illa grundaðum didaktiskum og metodiskum fatanum og loysnum. Loysnir, ið meira líkjast uppskriftum, heldur enn pedagogiskum umhugsni. Í summum førum verður tað til ovurhonds áherðsla á reglur og mørk. Í øðrum førum vísa ósemjur um greið pedagogisk mál og greiða fatan – gjøgnumskygni í gerandisdegnum – seg, sum innanhýsis ósemjur av persónligum slagi. Umlop, ið gera, at mann ikki fæst við tað, sum hevur týdning.

## Tvær pedagogiskar fortreytir í mun til børnini og menniskju annars

1. Barnaperspektivið. Tað einstaka barnið: egnar fortreytir, egin áhugamál, tørvir og rættindi. Sum pedagogiskt grundsjónarmið er hetta galdandi fyri allar samfelagsbólkar, pedagogurin arbeiðir við.
2. Samfelagsperspektivið. Krøv og forvæntningar, sum barnið møtir og fer at møta seinni í lívinum. Sjálvandi broytist hetta alt eftir aldri og samfelagsbólki, arbeitt verður við. Men samfelagsliga perspektivið eigur allatíðina at vera í huga.

Tað nýtist ikki at vera so, at hesi bæði – perspektivið á tann einstaka og samfelagsperspektivið – eru í andsøgn við hvørt annað, men pedagogiska avbjóðingin er at samanhugsa tey; soleiðis, at pedagogiska arbeiðið bæði tekur støði í tí einstaka menniskjanum, samstundis við, at tað – t.d. barnið – gerst ein partur av samfelagnum – felagsskapinum.

## Tað, sum pedagogurin ger, er pedagogiskt

Hjá flestu fakbólkum er pedagogikkurin eitt tekniskt amboð at røkka ávísum málum við. Hjá pedagogum er pedagogikkurin sjálv meiningin og innihaldið í arbeiðinum. Tann serstaki førleikin hjá pedagogum er, at teir handla pedagogiskt og reflektera við pedagogiskum fatanum og orðtilfari um teirra handlingar, handlingin er eitt mál í sær sjálvum – tað, sum pedagogurin ger, er pedagogiskt.

# Sosialpedagogiskur profilur

Myndir: Torfinn Smith

Sosialpedagogiskt arbeiði tekur støði í ábyrgdini hjá tí einstaka menniskjanum av egnum lívi. Í sosialpedagogiska arbeiðinum verða øll menniskju sædd sum virðismikil – við møguleikum og rætti til at handla í mun til egnan førimun.

Sosialpedagogiskt arbeiði er at stuðla og bjóða fram professionella hjálp og vegleiðing til børn, ung og vaksin, ið hava brúk fyri serstakari hjálp og stuðli til at taka aktivt lut í gerandislívinum, í sosiala felagsskapinum og samfelagslívinum.

Endamálið við sosialpedagogiska arbeiðinum er, at tað einstaka menniskjað livir eitt lív við ábyrgd uppá gott og ilt. Tað er tað góða lívið, ið er endamálið. Tað góða lívið kann vera ymiskt frá einum menniskja til eitt annað – endamálið er *inklusión*.

Sosialpedagogikkur verður fataður, sum ein pedagogisk prosess, ið er grundað í at menna, avdúka og fáa fram í ljósmálan persónliga tilfeingið hjá einstaka menniskjanum, við tí endamáli at menna lívsførleika, ið ger tað ført fyri at liva eina sjálvstøðuga tilveru. Ætlanin við sosialpedagogikki er at geva ískoyti til ein slíkan persónligan vøkstur.

## Snávingarsteinar í føroyskum sosialpedagogikki

Í einum føroyskum sosialpedagogiskum perspektivi noyðast vit at taka við, at vit á mangan hátt sum samfelag eru ávirkað av og bundin av bæði einum fyrrmodernaðum og einum modernaðum hugsunarhátti. Tann fyrri sigur okkum, at sosialpolitikkurin verður loystur í familjuni, meðan tann modernaða fatanin er stovnsliggeranin. Í tí seinmodernaða samfelagnum, vit liva í, er sosialpedagogiska hugsanin merkt av, at gongdin hevur verið frá individi til *individualitet*. Tann einstaki skal ikki longur vera tann sami, men vera broytiligur í mun til tær skiftandi avbjóðingarnar, ið liggja fyri framman – frá einum „stabilum" indentiteti til tillagandi *identitet*.

Harumframt er so tvístøðan, at stórur partur av sosialpedagogisku hugsan okkara er grundað í ein heilt øðrum landi og undir øðrum viðurskiftum – Danmark. Tað er einki galið við sosialpedagogisku hugsanini í Danmark, tvørturímóti, hon er eitt frálíkt inspiratiónsamboð. Men tað er, tá ið vit kritikkleyst fara at brúka hugsanir, gjørdar til eitt annað samfelag, at tað gleppur, tí vit ikki hugsa tað inn í okkara egna samanhang, og hvørjum, vit hava brúk fyri.

## Aldudalar og aldukambar – afturlítandi fatan í fortíðini, og framtíðarvendur sosialpedagogikkur

Fyri at skilja definitiónina, er neyðugt at lýsa andsøgnina til definitiónina. Sosialpedagogikkurin hevur lyndi til at venda sær móti fortíðini hjá børnum, ungum og vaksnum, og móti, tí, sum hevur eyðkent uppvøksturin hjá teimum. Henda vend kann forklárast við algongda brúkinum av psykiatriskum og medisinskum – men eisini sosialum – diagnosum, ið merkir arbeiðið við málbólkinum, og sum ofta liggur til grund fyri stovnum og øðrum tiltøkum. Hetta setir so aftur dám á fatanina hjá sosialpedagogunum av málbólkinum, ið fyri ein stóran part verður lýstur gjøgnum psykisku skaðarnar, tey hava havt ella fingið, vantandi menning ella kompetansur. Tey verða lýst við persónligum karakteristikki, sum t.d. tíðliga kensluliga skadd, persónligheitsbrek, konktaktórógv og impulsstýrd. Sosiali atburðurin verður lýstur sum vantandi evni til innlivan – og kontakt, konfliktskapandi og útatagerandi. Menningin verður ofta lýst sum ikki-aldurssvarandi.

Henda afturlítandi fatan móti fortíðini ger, at ofta hvørvur tað veruliga pedagogiska endamálið, ein pedagogikkur, ið vendir sær mótvegis framtíðini, har dentur verður lagdur á kompetansur, ið gevur málbólkinum amboð at liva eitt sjálvstøðugt lív í framtíðini og ikki í eini farnari fortíð.

Fortíðar hugsanin, orsøk/virkning-hugsanin ger, at langsiktaða málið við sosialpedagogiska arbeiðinum gerst ógreitt. Tann sjálvsagda og fataða søgan um fortíðina merkir bæði brúkara og pedagog, meðan tað narrativa kann broytast við at fortelja eina aðra søgu, bæði um fortíð og nútíð. Orsøk- virkning-viðurskiftini eru ikki altíð so einføld.

Sosialpedagogiska arbeiðið gerst tá kompensatoriskt, arbeiðið verður tá í stóran mun at javna og bøta um fortíðar hendingar og skaðar, har arbeiðið í størri mun eigur at rætta seg móti framtíðar lívinum.

## Endamálið við sosialpedagogiskum arbeiði, ið krevur eina professionella tilgongd

Fyrimyndin fyri sosialpedagogiskum arbeiði er vanliga samfelagið. Endamálið er at skapa ein vælvirkandi, meiningsfullan og virðiligan gerandisdag fyri einstaklingin og felagsskapin. Í sær sjálvum ljóðar hetta einfalt, men er í veruleikanum ein professionell uppgáva, ið krevur stóra menniskjaliga og fakliga kompetansu, tí talan er um viðurskifti millum professionell og menniskju, ið liva undir serstøkum samfelagskørmum, ofta á stovni, og sum hava serstakan tørv og atferð, soleiðis, at gerandisdagurin ofta als ikki er nøkur sjálvfylgja. Afturat hesum koma so uppgávur í mun til at samskifta við avvarandi og samfelagið annars.

## Felagsskapurin og einstaklingurin – spennið

Sentralu spurningarnir í sosialpedagogikkinum eru í spenninum millum einstaklingin



*Limafundur Pedagogsiku profilarnir*

og felagsskapin. Øll pedagogisk tiltøk hava við hesum fyri eyga, eina fatan av, at felagsskapurin ikki er ein forðing, men ein *fortreyt* fyri menningini og livda lívinum hjá tí einstaka – og øvugt. Felagsskapurin er upphavið til mentanina og málið, tann einstaki verður føddur inn í, og felagsskapurin gevur (eigur at geva) ta viðurkenning, sum tann einstaki er bundin av/treytaður av í síni sjálvsfatan.

Avgerandi spurningurin í sosialpedagogikkinum verður sostatt at greiða, hvussu best ber til at styrkja um teir møguleikar, sum eru í sínámillum ávirkanini millum tann einstaka og felagsskapin.

## Integratión og inklusión – margfeldi av verðum

Tað ber til at siga, at sosialpedagogikkurin skal skapa karmar fyri integratión fyri at fáa menniskjuna inn í felagsskapin, og inklusión við tí fyri eyga at lata felagsskapin inkludera margfeldið.

Tað er uppgávan hjá sosialpedagogikkinum at skapa fortreytir fyri sosialari luttøku í viðurkennandi felagsskapum.

Uppgávan hjá sosialpedagogikkinum er ikki, sum oftani hevur verið roynt, at finna loysnir við sosialari eksklusión, har tey, ið víkja frá, tey óynsktu, verða eyðlýst sum isoleraðir einstaklingar, uttan fyri normala samfelagið.

Grundleggjandi heimildin fyri sosialpedagogikkinum er ikki vitanin um ella góðtøkan av, at menniskjan livir í ymiskum verðum, men í strembanini eftir at skapa fortreytir fyri, at menniskjan kann liva í ymiskum verðum.

## Tvey dømi – millum fleiri – um endamálið við sosialpedagogiskum arbeiði

### *Børn og ung*
### *Mál*

Sosialpedagogiska uppgávan í mun til børn og ung, ið eru sett heiman, er at geva umsorgan í spenninum millum fakligt umhugsni um almennu menningina hjá børnum og ungum, ítøkiligari tilrættislegging av umstøðum fyri menning, og í royndunum at taka uppí og vera varug við lívsroyndirnar hjá barninum og tí unga, og teirra motiv og persónliga áhuga.

Um so er, at børn og ung, ið eru sett heiman, verða ein lutur í pedagogiskari planlegging og málhugsan, so verður barnið og tann ungi avmarkað til at verða objekt í eini viðgerðarhugsan.

Fylgja vit bara uttan fyrilit subjektiva tørvinum og áhuganum hjá barninum og tí unga, so avmarkast fakliga uppgávan til at vera ansing og herberg.

Sosialpedagogiska uppgávan verður á hesum økinum til í spenninum millum fakligar kompetansur hjá pedagoginum og egináhuganum hjá barninum og tí unga. Pedagogurin brúkar fakligu kompetansu sína at leggja til rættis menningarumstøður á ein slíkan hátt, at tað gerst møguligt hjá barninum og tí unga at taka aktivt lut sosialt í mun til egnan tørv, áhuga og motiv.

### *Fólk við menningartarni – bústovnar og verkstøð*
### *Mál*

Eitt av kjarnuvirðunum í arbeiðinum við menniskjum, er, at menniskjan er eitt subjekt, ið megnar at taka avgerðir um egið lív. Tann einstaki veit sjálvur, hvat er gott, hvat er til nyttu og hvat hevur týdning. Sagt øðrvísi: tann einstaki er fremsti serfrøðingur í egnum lívi. Tá ið tað kemur til fólk við menningartarni, er tað ofta, at vit lata tarnið koma fram um hesa hugsan. Tí at vit ofta samanbera við okkum sjálvi, hvat vit klára at taka avgerðir um. Men kjarnin er nettup, at vit og tann við menningartarni taka avgerðir,



Limafundur í Suðuroy

har vit eru stødd í lívinum, og soleiðis, sum vit eru før fyri.

Tað, sum kanska eyðkennir arbeiðið við fólki við menningartarni, er maktin – bæði tann veruliga og definitiónsrætturin hjá pedagoginum. Hesi viðurskifti gera seg eisini galdandi í vanligum pedagogiskum arbeiði, men eru meira gjøgnumskygd í pedagogiskum arbeiði við fólki við menningartarni. Neyðugt er, at vera medvitin um hesi maktviðurskifti, og refleksivt duga at síggja og duga at umsita maktina. Tá ið vit siga, at persónurin við menningartarni er eitt subjekt, ið klárar at taka avgerðir í egnum lívi, so er tað eyðvitað rætt, men pedagogurin er tann, ið setir karmarnar, og avger normativa virðið fyri sjálvsavgerðarrættinum. Maktin verður umsitin sum innara stýring, heldur enn sum uttara stýring. Tað slepst neyvan undan hesum vilkorum, men pedagogurin skal bara vera greiður yvir hetta, og taka tað við í sína pedagogisku hugsan og tilrættislegging.

Tað eru nógv onnur viðurskifti, ið eisini gera seg galdandi, t.d. at skapa karmar og fortreytir fyri, at menniskju við menningartarni fáa lívskvalitet. Vit kunnu ikki gera av fyri onnur, nær tey hava lívskvalitet. Men tað ber til at handla í mun til nakrar fortreytir, ið ikki eru givnar frammanundan, men væl gjøgnumdiskuteraðar og í samstarvi við tann einstaka brúkaran, soleiðis, at hesi fáa ta best gjørligu upplivingina av lívskvaliteti. Í hesum sambandi er menniskjaliga relatiónin so avgerandi, at arbeitt verður medvitið relationelt og við viðurkennandi relatiónum. Tað hevur alstóran týdning fyri integritetin hjá tí einstaka, at verða møttur viðurkennandi.

Pedagogurin skal í relatiónini fara frá bara at festa eyguni á trupulleikar og loysnir av trupulleikum, til at møta menniskjum við menningartarni við teirra serkenni og øðrvísni.

## Á leiðini til at skapa líka møguleikar fyri øll

Sosialpedagogikkurin kann ikki broyta samfelagið, men hann kann tryggja, at so nógv sum gjørligt – ið annars ikki høvdu verðið møtt – fáa eitt sámuligt lív.

Í farnu øld varð tryggjað øllum føroyingum líka rættindi. Stóra avbjóðingin nú er at tryggja øllum føroyingum líka møguleikar.

## Nøkur sosialpedagogisk øki

*Primert*

- Døgn- og viðgerðarstovnar fyri børn, ung og vaksin
- Bústovnar
- Verkstøð
- Familjudeplar
- Stuðlar
- Sernámsdepilin
- Stuðlar í heiminum
- Kvinnuheim
- Eldraøkið
- Viðgerðarstovnar fyri misbrúk
- Dag- og døgnstovnar fyri fólki við sálarligum og fysiskum meini
- Psykiatriska Deild
- Kriminalforsorgin

*Sekundert*

- Dagstovnar
- Frítíðarskúlar
- Ungdómur (t.d. í ungómshúsum, so sum, Margarinfabrikkini o.ø.)
- Sjúkrahús/Barnadeild
- Frítíðarskipanir til børn og ung

Alt sernámsliga økið er eisini eitt sosialpedagogiskt øki, har sosialpedagogikkurin er yvirskipaða hugsunargrundarlagið undir sernámsfrøðini

- Menniskju, ið bera brek
- Menniskju við autismu
- Menniskju við ADHD o.s.fr.





# Nýggjar bøkur










## Kom og leita

*Ein stuttlig bók hjá teimum smáu, sum fylgir músini Mimi runt frá morgni til myrkurs.*

Mimi ger mangt og hvat í hesari bókini, millum annað etur hon morgunmat, letur seg í, bakar kaku, fer í bað og sovnar at enda.

Avbjóðingin er at finna Mimi og alla familjuna, sum hava fjalt seg ymsa staðni á blaðsíðunum.

Hvør síða er full av litríkum aktivitetum. Aftast er eitt stuttligt Slanguspæl.

*Bókin er 28 bls. og heft. Katherine Lodge hevur skrivað og teknað, og Sólrún Michelsen hevur týtt.*

## Klandursskrímsl

*Nýggj skrímslabók, sum stór og smá bæði í Føroyum og kring heimin dámar væl.*

Tað er ikki av ongum, at øllum dámar skrímslini, tí høvundarnir viðgera evni, ið børnini kenna aftur

Lítla og Stóra skrímsl keða seg. Lítla skrímsl vil sleppa at tekna, men tað tímir Stóra Skrímsl ikki, hann vil heldur á seiðaberg. – *Tað eru vit altíð*, sigur lítla skrímsl og heldur, at teir skulu telva skrímslatalv. – *Rotið!* sigur Stóra Skrímsl, og soleiðis halda teir á at trætast, til Stóra Skrímsl fer um koll, og teir fara at klandrast.

Bøkurnar um skrímslini eru á sjey ymsum málum og hava fingið virðislønir og viðurkenningar og frálík ummæli uttanlands.

Sjálvt um skrímslabøkurnar kanska eru ætlaðar til 2-5 ára gomlu, so hóska bøkurnar í veruleikanum øllum, tí hvør hevur ikki roynt at klandrast við onkran?

*Bókin er 32 bls. og innbundin*

## Fyrsta bók í ár

*Ein elskulig bók til yngstu lesararnar, sum er eitt sindur øðrvísi.*

Nýggja bókin til tey smáu børnini er Pomm og Pimm eftir Lenu og Olof Landström

Pomm og Pimm fara út. Tað er heitt. Sólin skínur. Sum tað var heppið!

Soleiðis byrjar søgan um útferðina hjá Pomm og Pimm. Ein útferð, sum vendir hugtøkunum heppið og óheppið á høvdið. Er tað veruliga óheppið, at tað regnar? Ella er tað kanska heppið?

Tað er ringt ikki at forelska seg í Pomm og Pimm. Tann at síggja til einfaldi, men sniðfundigi teksturin hjá Lenu Landström fær lív við fittu tekningunum hjá Olof Landström. Saman hava tey gjørt fleiri kendar og væl umtóktar barnabøkur og sjónvarpsteknirøðir til børn.

Ein lítil feelgood-bók til bæði foreldur og tað lítla barnið.

*Niels Jákup Thomsen týddi og bókin er 26 bls./innbundin*

# Aðrar bøkur

les meir á www.bfl.fo









**Bólkur 1**

*Dato: 05. og 06. mars, kl. 09.35 - 16.30*
*Stað: Hotel Klaksvík*

**Stovnar:**
Dr. Margretha Barnagarður, Klaksvík
Dagstovnurin Mylnuhúsið, Klaksvík
Dastovnurin Bálkollan, Klaksvík
Barnagarðurin Fjallafípan, Klaksvík
Dagstovnurin Snjallabjalla, Klaksvík
Barnahúsið Margit, Klaksvík
Barnahúsið IMBA, Fossánes
Serdeildin hjá skúlanum við Ósánna
Dagstovnurin Gjái, Gøtu
Dagstovnurin í Fuglafirði
Barnagarðurin á Mýrunum, Runavík
Náttúrubarnagarðurin Sóljuhjarta, Søldafirði
Barnagarðurin á Svangaskarði
Barnagarðurin Brúsi, Leirvík
Dagstovnurin Stropi, Kambsdalur
Barnagarðurin við Kráir, Hvalvík
Dagstovnurin við Stórheygg, Hósvík
Dagstovnurin á Lítlafløtti, Strendur
Barnahúsið Sellin, Skála
Dagstovnurin millum Bóla, Kollafjørður
Korndalsgarður, Eiði
Dagstovnurin á Flatinum, Oyri
Dagstovnurin við Botnánna

**Bólkur 2**

*Dato 19. og 20. mars, kl. 09.00 - 16.00*
*Stað: Føroya Arbeiðarafelag*

**Stovnar:**
Frítíðarskúlin í Nes Kommunu
Dagstovnurin við Stórá, Rituvík
Dagstovnurin Kambur, Kambsdalur
Frítíðarheimið í Leirvík
Skúlaspírin
Frítíðarskúlin Varðin á Skála
Frítíðarskúlin Keldan, Skálafirði
Frítíðarskúlin á Tvøroyri
Frítíðarskúlin í Vági
Miðstovnurin
Frítíðarskúlin Smílibýlið
Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini
Frítíðarskúlin í Hoyvík
Frítíðarskúlin í Hornabø/ Spírin
Frítíðarheimið í KFUM
Frítíðarskúlin á Argjahamri
Frítíðarskúlin Sankta Frans
Frítíðarskúlin við Løgmannagreyt

**Bólkur 3**

*Dato 02. og 03. apríl, kl. 09.35 - 16.30*
*Stað: Hotel Klaksvík*

**Stovnar:**
Verkstaðurin á Brekku, Klaksvík
Sambýlið á Mýruvegi, Klaksvík
Umlættingarheimið Dáin, klaksvík
Kelduskákið, Klaksvík
Verkhúsið Stíggjur, Saltangará
Sambýlið á Rúnarvegi 3 og 6, Runavík
Dagstovnurin Reiðrið, Saltnes
Reiðrið-umlætting, Saltnes
Stuðulstænastan Eysturoy
Náttartoymið Eysturoy
Sambýlið á Leitisvegi
Frítíðartoymið við Løkin
Børn og Ung Almannaverkið
Familjudeildin
Garðsstova, Rókin, Argir
Næmingaheimið á Argjum
Frítíðarheimið í Skrivaragøtu
Familjustovan, Tórshavnar Kommuna
Barna- og Ungdómsdeildin í Tórshavnar Kommunu
Nýggjastova, bú- og viðgerðarstovnur
Skúlin á Trøðni

**Bólkur 4**

*Dato 09. og 10. apríl kl. 09.00 - 16.00*
*Stað: Starvsmannafelagið*

**Stovnar:**
Sambýlið á Bárðarfløtti, Vágur
Verkstaðurin inni á Bakka, Vágur
Eiragarður 16 A
Eiragarður 16 B
Sambýlið í Garðsgøtu
Sambýlið á Sundsvegnum
Sambýlið í Børkugøtu
Verkstaðið Vón
Verkhúsið Virkni
Sambýlið í Sørvági
Stuðulstænastan fyri vaksin
Sambýlið undir Gráasteini
Sambýlið á Fugloyarvegi/Svanga/ Grønlandsvegnum
Sambýlið í Pætursgøtu
Sambýlið á Mýruni 4 - 6
Sambýlið á Bóndaheygi
Sambýlið í Stoffalág
Sambýlið í Smærugøtu
Sambýlið í Niðaragøtu

**Bólkur 5**

*Dato: 15. og 17. apríl, kl. 09.00 - 16.00*
*Stað: Starvsmannafelagið*

**Stovnar:**
Barnagarðurin Eikilund
Dagstovnurin Mýrifípan, Trongisvágur
Barnagarðurin á Teiginum, Sandur
Barnagarðurin Gerðinum, Skopun
Barnagarðurin á Velbastað
Dagstovnurin á Landavegnum
Dagstovnurin Løkjatún
Ungdómshúsið loftið
Barnagarðurin Smílikullan, Miðvágur
Miðgarður, Miðvágur
Dagstovnurin Sóljugarður, Sandavágur
Dagstovnurin Áarlon, Kvívík
Dagrøktin í TK
Dagstovnurin Látipípan, Vestmanna
Dagstovnurin Alvalon, Sørvágur
Dagstovnurin Gjáarlon, Vestmanna
Látrið, Nólsoy
Ungdómshúsið Loftið, Miðvágur
Ungdómshúsið í Kaldbak
Flatnagarður, Kaldbak

**Bólkur 6**

*Dato: 30. apríl og 01. mai, kl. 09.00 - 16.00*
*Stað: Starvsmannafelagið*

**Stovnar:**
Býlingshúsið á Norðasta Horni
Býlingshúsið undir Fjalli
Býlingshúsið undir Brúnni
Býlingshúsið á Ternuryggi
Býlingshúsið á Flat
Býlingshúsið millum Gilja
Býlingshúsið inni á Gøtu
Býlingshúsið í Maritugøtu
Lítliskógur
Kurla
Dagstovnurin í Øksnagerði
Dagstovnurin á Løgmannabreyt
Dagstovnurin Birkilund
Dagstovnurin á Hamrinum
Barnagarðurin við Velbastaðvegin
Dagstovnurin Sólareyga
Dagstovnurin á Argjum
Dr. Ingridar barnagarður
Skt. Josefs barnagarður
Stella Maris Vøggustova
Dagstovnurin í Hoyvík





# Altjóða kongress hjá felagsskapinum Aieji verður hildin í ár í Luksemborg, dagarnar 2.- 5. apríl

Orð: Maud Wang Hansen

Aieji er felagsskapur hjá sosialpedagogum og øðrum sosialarbeiðarum kring heimin.

Sosialt arbeiði fevnir vítt. Tað, sum vit kenna í vesturheiminum og serliga í Norðurlondum, er, at ein miðallong ella hægri útbúgving er grundstøðið hjá flestu starvsfólkunum á sosiala økinum. Vit kenna tó eisini til dømi um fólk, sum taka á seg ymiskt sjálvboðið arbeiði ella annað uppsøkjandi og fyribyrgjandi arbeiði í ávísum økjum og millum ávísar sosialt útsettar bólkar í samfelagnum. Hetta slagið av sosialarbeiðarum er allastaðni kring heimin, og nógv sosialt arbeiði verður útint á gøtunum millum fólk, sum hava tørv á sosialum stuðli av ymiskum slag. Nógvar ymiskar útbúgvingar eru á sosiala økinum, og nógvastaðni tekur sosialt arbeiði støði í tí at hjálpa, at læra fólk at lesa og skriva, at læra fólk at taka hond um fólk við breki av ymiskum slag og at forða fyri fátækradømi og sosialari útstoyting. Inklusjón er eitt av lyklaorðunum.

Aieji hevur sum mál at savna hesar ymisku fakbólkarnar og at varpa ljós á arbeiði teirra og at menna samstarv og netverkan.

Heimasíðan hjá Aieji leggur út aktuellar frágreiðingar frá limalondunum um teirra arbeiði.

Handan allar hesar ymisku formarnar fyri sosialum arbeiði, liggur eisini ein miðvís gransking innan sosiala økið.

Á kongressini í døgunum 2.- 5. apríl verður høvi hjá luttakarum at hitta nógv av hesum dugnaligu sosialarbeiðarum, granskarum og sosialpedagogum, antin á fyrilestrum, verkstovum ella á vitjanum í økinum. Eitt serligt norðurlendskt forum verður tann fyrsta dagin, ein sokallaður Nordic camp, sum NFFS stendur fyri. Forsetin í Aieji er navnframi formaðurin í SL, Benny Andersen, sum hevur vitjað í Føroyum.

Vónandi liggur fyri at hava føroyska umboðan á hesi sera áhugaverdu kongress. Heimasíðan, har til ber at melda seg til, er: http://aieji.net/


Við fleiri enn 200 veitarum, hevur Blika møguleikan at veita nærum alt stovninum tørvar.

ÍTRIV · LEIKUR · FRÍTÍÐ OG SPÆL · NÁMSFRØÐILIGT TILFAR · REINGERÐ · BLÆUR O.A. NÝTSLUVØRUR · INNBÚGV OG INNRÆTTING · SPÆLIPLÁSS · UTTANDURALEIKUR



Blika

TELEFON 606 666



Durita Toftegaard
**Søluráðgevi**
Norðuroyggjar,
Eysturoy,
Norðurstreymoy

Fartelefon 233 661
durita@blika.fo



Jónfinn Petursson
**Søluráðgevi**
Suðurstreym,
Vágar, Sandoy

Fartelefon 233 665
jonfinn@blika.fo

# Tínir møguleikar í ALS

Orð: Katrin Poulsen · Mynd: Torfinn Smith

Arbeiðsloysisskipanin er ikki einans ein skipan, sum umsitur inngjald frá løntakarum og arbeiðsgevarum og útgjald til fólk, sum eru arbeiðsleys. Umframt arbeiðsávísing eru heimildir, sum hava við eitt nú førleikamenning og starvsvenjing at gera, og sum byggja á arbeiðsmarknaðarpolitikk. Seinastu árini hevur ALS havt ein alt virknari arbeiðsmarknaðarpolitikk við støði í teimum avbjóðingum, sum arbeiðsloysi setir tí einstaka, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og samfelagnum sum heild.

Umsitingin í Pedagogfelagnum fær javnan fyrispurningar, bæði frá starvsfólki og leiðarum, um hvørjar møguleikar ALS hevur at bjóða teimum, og hevur tí spurt seg fyri hjá Bergtóru Høgnadóttir, kveikjara í ALS.

Eitt av tilboðunum er at geva persónum, sum fáa útgjald frá ALS, møguleika at koma í starvsvenjing í mesta lagi í fimm mánaðir hjá hvørjum arbeiðsgevara. Her er talan um eina avtalu millum tann arbeiðsleysa, arbeiðsgevaran og Arbeiðsloysisskipanina. Tann arbeiðsleysi skal sjálvur finna sær eitt arbeiðsstað. Talan skal vera um eitt fulltíðarstarv, og hann ella hon, sum er í starvsvenjing, fær vanliga løn frá arbeiðsgevaranum. Hinvegin fær arbeiðsgevarin endurrindaða upphæddina, sum tann arbeiðsleysi hevði fingið frá Arbeiðsloysisskipanini, greiðir Bergtóra frá. Hon leggur afturat, at ein treyt er, at tann arbeiðsleysi ikki hevur verið í starvi hjá viðkomandi arbeiðsgevara tað seinasta árið, og harafturat er umráðandi, at allir partar hava játtað og undirskrivað avtaluna, áðrenn starvsvenjingin byrjar.



*Bergtóra Høgnadóttir Joensen er kveikjari í ALS*

Vert er at geva gætur, at øll leys almenn størv skulu lýsast alment sambært almenna starvsfólkapolitikkinum.

Pedagogfelagið er vitandi um fleiri límir, sum hava verið í ALS-starvsvenjing. Onkur teirra fyri at nema sær tær starvsroyndir, sum krevjast fyri at sleppa inn á útbúgving í Danmark.

## ALS farloyvi

Starvsfólk í føstum starvi hava møguleika at søkja um stuðul í sambandi við farloyvi, sum kann vara úr trimum og upp í tólv mánaðir. Treytin er, at arbeiðsgevarin er sinnaður at seta ein arbeiðsleysan í sama starv í farloyvisskeiðinum. Avloysarin skal beint undan farloyvisskeiðinum hava fingið arbeiðsloysisstuðul í minsta lagi í tríggjar mánaðir. Persónar í farloyvi skulu vera tøkir í arbeiðsávísingini. Tað er arbeiðsgevarin, sum vendir sær til Arbeiðsloysisskipanina og sigur frá, at hann hevur starvsfólk, sum ynskir at fara í farloyvi.

## Vikarskipanin

Arbeiðsgevarar hava eisini møguleika at seta seg í samband við vikartænastuna hjá ALS. Arbeiðsgevarin kann her biðja um ein vikar, treytað av at hann hevur í minsta lagi fýra samanhangandi tímar at bjóða viðkomandi. Vikarurin fær vanliga sáttmálabundna løn frá arbeiðsgevaranum.





# Ársaðalfundur felagsins

## verður á Hotel Føroyum tann 16. mars 2013



**Dagurin byrjar við skráseting kl. 9.00.**
**Atkvøðuseðlar verða útflýggjaðir í skrásetingini.**
**Fundurin byrjar kl.10.00 við hesi fundarskrá.**
**Gestarøðari: Ingibjørg Kristleifdóttir**



*Ingibjørg Kristleifsdóttir*

Fødd 27. Mars 1961. Mamma at trimum, svigarmamma at trimum, omma at fýra og býr saman við manni og soni sínum í miðbýnum í Reykjavík. Hon starvast sum forkvinna í FSL sum er ein av sjey eindum í Íslendska Lærarafelagnum KI (Kennarasamband Islands).

Útbúgvin í 1988 sum barnagarðslærari og hevur tað mesta av arbeiðslívinum starvast sum leiðari í barnagarði. Hon hevur diplom til m.ed frá 1996 og 2002.

Ingibjørg hevur starvast í KI sum næstforkvinna síðan 2008. Leiðararnir stovnaðu FSL í 2010 og Ingibjørg hevur verið forkvinna síðan tá. FSL er Félag stjórnenda leikskóla og hevur 480 limir, sum eru leiðarar, varaleiðarar og ráðgevarar á kommunuskrivstovunum. FSL arbeiðir tætt saman við FL (Félag leikskolakennara) og nøkrum fyritøkum um felags mál og útbúgving.

## Fundarskrá

A. Val av fundarstjóra og skrivara
B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin
C. Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar
D. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar
E. Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar
F. Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins
G. Val av formanni triðja hvørt ár
H. Val av nevnd
I. Val av eykalimum
J. Val av grannskoðarum
K. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi
L. Ymiskt

Felagið bjóðar døgurða kl.18.00 og aftaná verður tónleikur og hugni til á midnátt. Vinarliga skráset um tú luttekur til døgurðan. Gisting: Limir, sum luttaka á aðalfundinum, kunnu leiga kamar á Hotel Føroyum, í Kerjalon ella á Hotel Tórshavn.

Á Hotel Føroyum: Einakamar kr. 1.000, dupultkamar kr. 1.200,-.

Kerjalon íroknað morgunmat og seingjarklæðir: 295 kr per persón í dupultkømurum ella 4-manskømurum.

Hotel Tórshavn: Kr.700 einakamar, kr. 900 dupultkamar.

Morgunmatur er við í prísinum. Bílegging beinleiðis á Hotel Føroyum tel. 317500.

Tilmeldingin til aðalfundin, sum er persónlig, fer fram á heimasíðu felagsins www.pedagogfelag.fo ella við at ringja á tel. 357576. Seinasta freist at tekna seg til aðalfundin er tann 8. mars kl.14.00.

*Vælkomin á aðalfund*
*Nevndin*

## Nevndarval

Tveir nevndarlimir standa fyri vali í ár. Tað eru Guðrun Eysturlíð, ið ikki stillar upp aftur og Elin N. W. Tausen, sum tekur við afturvali.

Tvey uppskot vóru til nevndarsessirnar, tað eina var Wenzel Olsen og hitt var Elin N. W. Tausen. Tey eru sostatt bæði vald í nevndina komandi trý árini. Einki nevndarval verður sostatt á hesum aðalfundinum.

## Ad. I. Val av eykalimum

§ 11, 4.stk. Eykalimir. Valdir verða 3 eykalimir. Av hesum eykalimum skal minst ein vera hjálparfólk og minst ein pedagogur. Eykalimir verða valdir á ársaðalfundinum hvørt ár og valskeiðið er tí eitt ár.

Reglurnar í § 8, stk.7, pkt.1, 3, 8, 9 og 10 eru eisini galdandi fyri val av eykalimum. Fyrstvaldi eykalimurin tekur við, tá ein av verandi nevndarlimum fer frá ella ikki kann møta í longri tíð. Eykalimurin situr fyri viðkomandi nevndarlim, so leingi hesin er burturstaddur, tó ikki longur enn til komandi ársaðalfund, tá valskeiðið hjá eykaliminum gongur út.

Talið av atkvøðum, sum hvørt valevni fær, er avgerandi fyri, hvør er fyrst- næst- og trivaldur.

## Ad. J. Val av grannskoðarum

Sambært ásetingunum í § 13, stk.2 skulu grannskoðarar veljast hvørt ár.

Internu grannskoðararnir eru: Mirjam Johannesen og Vera Bjørgvin.

## Ad. K. Viðgerð av innkomnum uppskotum og áseting av limagjaldi

Uppskotini 1, 2 og 3 eru sett fram av nevndini sambært áheitan frá aðalfundinum í 2012.

Endamálið við øllum trimum uppskotunum er, at fylla pening skjótt í aftur verkfallskassan og at kunna lata pening til umsøkjarar úr A- og U-grunninum.

## Uppskot nr. 1

Uppskot um at hækka limagjaldið úr 1,6% til 1,8% komandi 4 árini og beinleiðis flyta tey 0,2% í Aktións- og Upplýsingargrunnin.

Grunda á ynski um at fylla Aktións- og Upplýsingargrunnin skjótt aftur, leggur nevndin fram uppskot um, at hækka limagjaldið úr 1,6% til 1,8% í eitt 4 ára tíðarskeið.

Tey 0,2% fara beinbleiðis í A- og U-grunnin.

### *Til atkvøðugreiðslu:*

*Limagjaldið hækkar úr 1,6 til 1,8% komandi 4 árini frá 1.mai 2013 at rokna.*

*0,2% av limagjaldinum fara beinleiðis í Aktións- og Upplýsingargrunnin hetta tíðarskeiðið.*

## Uppskot nr. 2

Uppskot um at flyta tey 5% av limagjaldinum, sum fara í Húsagrunnin yvir í A- og U-grunnin komandi 4 árini.

Grunda á, at nevndin ynskir at fylla Aktións- og Upplýsingargrunnin skjótt aftur, leggur nevndin fram uppskot um, at tey 5% av árliga limagjaldinum, sum fara í Húsagrunnin, í staðin fara beinleiðis inn í A- og U-grunnin í eitt 4 ára tíðarskeið.

Uppskotið kemur í gildi tá aðalfundurin hevur samtykt tað.

### *Til atkvøðugreiðslu:*

*5% sum verða flutt av árliga limagjaldinum inn í Húsagrunnin, verða komandi 4 árini flutt í A- og Upplýsingargrunnin.*

## Uppskot nr. 3

Uppskot til broytingar í reglugerðini fyri Aktións- og Upplýsingargrunnin

Uppskotið verður lagt fram til samtyktar, fyri at A- og U-grunnurin kemur at virka sum ein rættur verkfallskassi og fyri at grunnurin kemur fíggjarliga skjótt aftur á føtur, og virkar sum upplýsingargrunnur, sambart endamálsorðingini fyri grunnin.

*Tað sum er skrivað við **reyðum** er tað sum uppskotið leggur upp til at broyta og seta inn í reglugerðina, meðan tað sum er strikað yvir verður tikið burtur.*

## Reglugerð um Aktiónsgrunn/ Upplýsingargrunn

**Endamál:**
At stuðla limum felagsins undir aktión/verkfalli.

Harumframt at **veita limum felagsins fíggjarligan stuðul til at** granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.

**Nevndin:**
Í nevndini fyri grunnin eru 3 limir. 1 frá nevndini í Pedagogfelagnum og 2 álitisfólk.

**Inntøkur:**
10% ~~5%~~ av hvørjum limagjaldi + rentur.
50.00 kr. verða settar í grunnin sum stovnspeningur.

**Veitan úr:**
~~Skrivlig umsókn fyri nevndina fyri grunnin. Rentur av innistandandi peningi kann latast til umsøkjarar, ið vilja granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum. Stovnspeningur + 5% inngjaldið skal bert kunna nýtast til at stuðla limum felagsins undir verkfalli / aktión.~~

**Stuðul kann søkjast úr grunninum við skrivligari umsókn til nevndina, sambært ásettu treytum og mannagongdum, sum nevndin fyri grunnin hevur samtykt. Stovnspeningurin + 90% av inngjaldinum skal bert kunna nýtast til at stuðla limum felagsins undir verkfalli/aktión. 10% av inngjaldinum kann latast til umsøkjarar, ið vilja granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.**

**Roknskaparárár:**
Roknskaparár grunsins er álmanakkaárið.

**Avtøka:**
Avtøka av grunninum fer fram sum lógarbroyting(hjá) Pedagogfelagnum. Aðalfundurin avgerð tá hvat peningurin skal nýtast til.

*Nevndin í Pedagogfelagnum*

*Soleiðis góðkent á aðalfundinum 27/4-85*
*Broytt á aðalfundinum 08/04-2000 vegna at umboðsráðið verður strikað*

# Frágreiðing frá nevndini 2013

## Nevndin

Nýggja nevndin fór til verka beinanvegin og hittist til fyrsta nevndarfundin saman við tiltakslimum, har nevndin skipaði seg við Jógvan Philbrow sum næstformanni, Guðrun Eysturlíð sum skrivara og Elini N. W. Tausen og Jannie Jacobsen sum nevndarlimum.

## Umsitingin

Eyðvør á Váli, sum var í avloysarastarvi fram til summarferiuna, hevði sum høvuðsuppgávu at avgreiða lønarendurgjøldini til limir, sum høvdu verið í verkfalli. Bára kom aftur í starv eftir barsil eftir summarferiuna, og Katrin varð sett sum umsitingarleiðari. Umsitingin, sum nú er fullmannað, hevur arbeitt við mannagongdum og leggur seg alsamt eftir at veita eina góða tænastu og ráðgeving til limirnar.

## Skeið

Pedagogfelagið fer í næstum undir at skipa fyri skeiðum fyri álitisfólkini í felagnum. Álitisfólkini verða býtt upp í 6 bólkar. Katrin Poulsen, umsitingarleiðari, og Páll Nielsen, advokatur, fara at undirvísa á skeiðinum, sum varir í tveir dagar. Undirvíst verður í álitisfólkaskipanini, fyrisitingarlógini og starvsfólkarætti. Pláss er fyri umleið 20 álitisfólkum á hvørjum skeiði. Nærri skrá og kunning sæst á heimasíðu felagsins.

## Fakfagnaðurin

9. og 10. november 2012 skipaði Pedagogfelagið fyri stórfingnum fakfagnaði, har út við 300 limir luttóku á áhugaverdum verkstovum og fyrilestrum, antin sum fyriskiparar ella sum luttakarar. Eitt kloddateppi av fakligum fyrilestrum og framløgum var breitt út hesar báðar dagarnar á Hotel Føroyum. Eitt framúr vælskipað tiltak, sum limir sjálvi tóku stig til, og sum heilt víst verður tikið uppaftur. Tann 10. november varð skipað fyri einari gallaveitslu um kvøldið, har 130 limir hugnaðu sær við góðum mati, tónleiki, røðum og sera góðum hýri. Aftaná spældu Hitmen til dans.

## Fólkafundurin 2012

Pedagogfelagið luttók á Fólkafundinum 2012 í Hoyvíkshøllini. Tiltakið var áhugavert, og nógv fólk vitjaðu okkara bás og fingu eitt prát um faklig viðurskifti, m.a. samráðingarspurningar, og dúgliga varð samskift við kommunur um m.a. fyrireikingartíð og ískoytisútbúgving. Eitt frálíkt høvi at netverka og møta øðrum felagsskapum og feløgum.

## Fakfelagssamstarvið

Fakfelagssamstarvið er til enn, tó tað er virkið á ein annan hátt enn áður. Formenninir hittast hvønn mánað at viðgera felags viðurskifti og umrøða politisku og samfelagsligu støðuna. Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar er aftur partur av Fakfelagssamstarvinum, og tað fegnast vit um. Tað verður neyvan farið til felags samráðingar aftur, tí har standa feløgini so ymisk, at tað er ógjørligt at skipa tílíkar samráðingar, sum nú er.

## Hoyringsuppskot

Felagið hevur havt eina røð av uppskotum til hoyringar og hevur viðgjørt tey og svarað. Teirra millum eru:

- Eftirlønaruppskotið
- Vard størv
- Rúmligi arbeiðsmarknaðurin
- Almannaveitingar
- Heilsutrygd
- Barsilslógin
- Vardir verkstaðir og virknishús
- Kynsligur ágangur
- Barnaváttanir
- Heildarætlan um harðskap
- Barnaumboðsstovnur
- Avtøka av Landsbankanum
- Tænastumannalógin

## Javnstøðunevndin

Felagið hevur haft eitt mál fyri á fundi Javnstøðunevndina í sambandi við ein lim, sum ikki fekk løn vegna sjúku, meðan hon var við barn.

## Keyp av LÍV

23 fakfeløg tóku stig til at keypa LÍV. Pedagogfelagið var umboðað í arbeiðsbólki, sum skuldi kanna møguleikarnar fyri hesum keypi. Nógv fundarvirksemi hevur verið, og nógvar forðingar hava verið á leiðini, men samanumtikið hevur tilgongdin verið sera jalig. Samstarvssáttmáli er undirskrivaður við Ognarfelagið LÍV, eins og ein treytaður keypssáttmáli er undirskrivaður. „Due dilligence"-kanningar eru gjørdar av felagnum LÍV, og hesar gjølligu kanningar hava ikki víst ábendingar um, at tilgongdin við keypinum ikki skal halda fram. Bólturin liggur nú hjá tryggingareftirlitinum, og vónandi gongur ikki alt ov long tíð, áðrenn boð koma frá teimum. Endamálið við, at fakfeløgini vilja keypa LÍV er, at eftir stóru avbjóðingarnar við forskatting av pensjónum er tað neyðugt at finna loysnir, fyri at limirnir kunnu varðveita eina so góða og bíliga skipan sum gjørligt. Hetta meta fakfeløgini at klára við einum einføldum tilboð upp á tryggingar og einum arbeiðssetningi um at fáa umsitingargjaldið niður, eina sokallaða pensjónskassalíknandi skipan.

## Samlagstrygging

Nýggjur sáttmáli er gjørdur við LÍV, eftir at allar tryggingar eru lagdar um til marknaðarrentu. Limir, sum eru í ALS, kunnu nú varðveita samlagstryggingina við at gjalda limagjald av ALS-gjaldinum umframt at flyta 125 kr. um mánaðin til felagið. Nevndin hevur brúkt nógva tíð upp á at kanna møguleikan fyri at bjóða øllum limum eina trygging við óarbeiðsføri og kannar í løtuni ein leist, sum allir limir kunnu fáa gleði av, uttan at tað gerst ov dýrt fyri tann einstaka.

## Eftirløn

Nevndin í Pedagogfelagnum hevur tikið avgerð um at flyta eftirlønirnar hjá øllum limum yvir í LÍV frá 1. apríl 2013, soleiðis at allir limir í framtíðini fáa somu tilboð. Eftir at hava kannað fleiri møguleikar er nevndin komin til ta niðurstøðu, at frægast er at hava øll savnað á einum stað, og tað mest natúrliga er, nú ætlanin eisini er at skipa LÍV sum pensjónskassa, at samla alt í LÍV. Sostatt verða 60'ára konturnar hjá hjálparfólkunum fluttar í LÍV, soleiðis at hjálparfólk í framtíðini fáa somu møguleikar, sum pedagogar hava.

## Álitisfólk

Regluligu álitisfólkafundirnir hava verð væl vitjaðir. Á skránni hava m.a. verið bygnaðarbroytingarnar í Almannaverkinum og teir pedagogisku profilarnir, har Rógvi Thomsen legði fram. Á seinasta álitisfólkafundi hevði Jóhannus á Rógvi eitt upplegg um strongd.

Øll álitisólk hava fingið álitisfólkamappuna, og er hon eitt hent amboð at hava við hondina. Nú skeið verða hildin fyri álitisfólk, verður álitisfólkamappan amboðið í undirvísingini.

## Almannaverkið

Bygnaðarbroytingarnar í Almannaverkinum hava ført við sær nógv fundarvirksemi. Stóru ætlanirnar um at leggja Almannastovuna og Nærverkið saman eru nú komnar væl áleiðis, og leiðsluprofilurin í skipanini er munandi broyttur. Tað hevur tikið langa tíð at koma fram til, hvat ætlanirnar veruliga vóru við teim sokallaðu satelittunum/eindunum, og hvussu tær skuldu skipast. Tá tann parturin var liðugur, varð uppskot sent til Lønardeildina um flokking av eindarleiðara- og varaeindarleiðarastørvunum, eins og ein upphædd varð sett á nøkur samskipara-størv, sum enn ikki eru nóg væl lýst. Pedagogfelagið hevur luttikið á nærum øllum fundum, men tað hevur verið torført at halda fokus á heildina, tí ætlanirnar hava verið sera leysar og yvirskipaðar, og nógv viðurskifti eru broytt á leiðini.

## Verkfallið

Tað, sum hevur tikið mest tíð hjá umsitingini fyrru árshálvu av 2012, var avgreiðslan av endurgjaldi fyri verkfallið. Tað var torført at fáa listar við lønarseðlum frá summum kommunum og frá Almannaverkinum. Tá vit so fingu lønarseðlar, vísti tað seg, at nógvir limir als ikki høvdu goldið tað limagjald, sum tey áttu at gjalda. Fyri at hesir limir kundu fáa sítt endurgjald, var neyðugt at gera avtalur um at gjalda limagjaldið aftur. Tað er sera týdningarmikið, at limir fylgja við í, um tey gjalda rætt limagjald, og annars um trygging o.a. verður goldið hvønn mánað, tí ein missir snøgt sagt síni limarættindi, um gjøldini ikki koma til felagið. Tað eydnaðist tó at avgreiða øll endurgjøldini, umframt at umsitingin fekk gott yvirlit yvir lønarviðurskiftini hjá limunum, og saman fingu vit rættað teir skeivleikar, sum vóru, soleiðis at limirnir hava síni viðurskifti í lagi. Tað er sera umráðandi, at limur fylgir væl við, serliga nú nógv ikki fáa ein pappírslønarseðil, men bert hava netmiðluna at halda seg til.

## Mentamálaráðið

Mentamálaráðið, sum varðar av dagstovnalógini, og sum hevur evsta eftirlitið við dagstovnaøkinum, hevur torført við at lyfta hesa uppgávu. Snøgt sagt eru so nógvar frustratiónir og so nógvir leysir endar, at tað ber illa til at siga, at landsstýrismaðurin tekur hesa ábyrgd í serliga stórum álvara. Nevnast kann Dagstovnaráðið, sum fyrrverandi landstýriskvinnan Helena Dam á Neystabø, setti á stovn. Einans tveir fundur hava verið, og ráðið er als ikki virkið, hóast stórar avbjóðingar eru á økinum við teim 6 ára gomlu børnunum. Dagstovnaráðið hevur til uppgávu at ráðgeva landsstýrismanninum í fakligum spurningum. Vit hoyra stundum um tilmæli frá fólkaskúlaráðnum, eisini um broytingar á starvsøkinum hjá okkara limum, og tað kunnu vit ikki góðtaka. Fakliga ráðgevingin eigur sjálvandi at koma frá námsfrøðingum, sum starvast á dagstovnaøkinum, og ikki frá fólkaskúlalærarum, sum einki kenna til fakligu avbjóðingarnar á dagstovnum.

Serliga týdningarmikið er, at Dagstovnaráðið verður virkið aftur beinanvegin, tí eingin fulltrúi í Mentamálaráðnum arbeiðir í løtuni fyri dagstovnaøkið, og landsstýrismaðurin hevur sostatt onga ráðgeving yvirhøvur á dagstovnaøkinum. Tað meta vit vera sera álvarsamt, og nevndin góðtekur ikki, at kommunurnar nokta starvsfólkum at møta á fund í arbeiðsbólki, sum landsstýrismaðurin hevur sett á stovn.

Á temadegi í Norðurlandahúsinum um týdningin av list fyri menningina hjá børnum gjørdist tað enn greiðari enn nakrantíð, at dagstovnaøkið ongan góðan eigur í Mentamálaráðnum. Í staðin fyri, at landsstýrismaðurin legði dent á týdningin av at menna kreativu evnini hjá børnum frá vøggustovu av og at skipa umstøðurnar rundan um kreativu lærugreinirnar, so tær kunnu menna børnini, kom ein forkølað áheitan á kommunurnar um at taka væl í móti hesum tilmælum, sum professarin kom við.

## Ískoytisútbúgvingin

Ískoytisútbúgvingin, sum var sett í gongd á Fróðskaparsetrinum, hevur víst í verki, hvussu stórur munur verður gjørdur á starvsfólki innan fólkaskúlan og á dagstovnaøkinum. Kunngerðin, sum varð sett í gildi, hevði onga áseting um, hvør skuldi gjalda fyri útbúgvingina, og tað endaði við, at námsfrøðingarnir sjálvir máttu gjalda, og ávísar kommunurnar hava goldið fyri síni starvsfólk. Tað er átaluvert, at Mentamálaráðharrin setir í verk eina útbúgving fyri tveir fakbólkar uttan at gera púra greitt, hvørjar treytirnar fyri gjaldi fyri útbúgvingina eru. Í sáttmálanum fyri pedagogar stendur í § 21 at: „Pedagogar hava rætt at koma á eftirútbúgvingarskeið fyri at halda útbúgvingina við líka. Allar útreiðslur í hesum sambandi verða goldnar av arbeiðsgevaranum." Treytin fyri at fáa ískoytisútbúgvingina goldna frá arbeiðsgevaranum er fyrst og fremst, at umsókn verður latin arbeiðsgevaranum. Felagið av teirri greiðu fatan, at tað er arbeiðsgevarin, sum skal gjalda fyri hesa ískoytisútbúgving. Málið koyrir enn, og felagið hevur nú vent sær til KAF fyri at staðfesta ábyrgdina.

## Fyrireikingartíðin

Ein staðfesting av fyrireikingartíðini varð gjørd, tá semjan varð undirskrivað tann 21. februar 2012. Fleiri arbeiðsgevarar hava loyst hesa støðuna við at fylgja ráðgevingini frá sínum leiðarum um, hvussu fyrireikingartíðin best kemur teirra stovni til gagns. Aðrir arbeiðsgevarar hava enn ikki loyst hendan knútin. Í Tórshavnar kommunu settu tey ein arbeiðsbólk at gera tilmæli til umsitingina um, hvussu málið kann loysast. Hetta tilmælið er givið víðari,

men vit hava enn ikki sæð nakað ítøkiligt úrslit frá umsitingini í kommununi. Eysturkommuna setti sær fyri at loysa málið í samráð við leiðararnar har. Vága kommuna vildi bíða, til ein felags leistur var gjørdur fyri allar kommunur. Málið liggur nú hjá KAF, og felagið hevur ta fatan, at KAF leggur ábyrgdina yvir á einstøku leiðararnar at finna pláss fyri fyrireikingartíðini, men tað letur seg bert gera, har nóg mikið av tíð er, ella har játtanin loyvir tí. Felagið átalar tí, at ábyrgdin aleina verður løgd hjá leiðarunum, tí vit meta, at hon eigur at liggja hjá arbeiðsgevaranum sjálvum.

## Limafundir

Nevndin hevur skipað fyri fleiri limafundum, sum hava verið væl vitjaðir, og gott kjak hevur verið um tey evnini, sum hava verið fyri á fundunum. Nevndin fegnast um áhugan fyri limafundum, og vit fara at halda fram við hesum. Góð hugskot eru vælkomin um, hvørji evni skulu takast upp á hesum fundum, og heitt verður á limirnar um at venda sær til nevndina við møguligum uppskotum. Nevnast kunnu m.a.:

- Marlborow-metodan
- Stuðlar í fólkaskúlanum
- Tey 6 ára gomlu
- Námsfrøðiligu vangamyndirnar við Rógva Thomsen
- Súsanna Olsen hugleiddi um fakliga leiðslu

## Stuðlar í fólkaskúlanum

Felagið hevur í longri tíð arbeitt við at bøta um starvsviðurskiftini hjá okkara limum, sum starvast sum stuðlar í fólkaskúlanum.

Í juni 2012 hevði felagið ein fund fyri stuðlar í Eysturoynni, har nevndin fekk høvi til at seta seg betur inni í starvsviðurskiftini hjá stuðlunum.

Á fundi við landsstýrismannin í mentamálum, Bjørn Kalsoy, í oktober 2012, greiddi nevndin frá truplu umstøðunum hjá stuðlum í fólkaskúlanum og heitti á landsstýrismannin at taka málið upp.

Landsstýrismaðurin hevur nú sett ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk, har arbeiðssetningurin er at lýsa verandi støðu og greina, hvat ónøgdin snýr seg um og gera eitt tilmæli um, hvussu setanarviðurskiftini skulu skipast. Ætlanin er, at tilmælið skal vera liðugt at handa Mentamálaráðnum skjótast til ber.

Føroya Pedagogfelag hevur eitt umboð í arbeiðsbólkinum, sum eisini er mannaður við umboðum frá lønardeildini, Mentamálaráðnum, Sernámi og Føroya Lærarafelag.

## Forskúlabørn

Limafundur um tey 6 ára gomlu var í hølunum hjá Starvsmannafelagnum herfyri. Nógv fólk møttu á fundinum, og gott kjak var millum limirnar. Fleiri áhugaðir limir meldaðu seg til at luttaka í einum bólki, ið hevur ætlan um at gera eitt álit um virksemið rundan um tey 6 ára gomlu børnini. Nógvar ymiskar meiningar eru um hendan aldursbólk, og hvørja skipan tey skulu hoyra til. Í nevndini eru ymiskar meiningar um, hvat er tað besta tilboðið til tey 6 ára gomlu. Vit hava fleiri dømi um forskúlar, og vit hava enn fleiri dømi um skipanir á dagstovnunum við serligum atliti at teimum størru børnunum. Avbjóðingarnar eru stórar, og sera týdningarmikið er, at atlit verður tikið til børnini, og hvat mett verður at vera best fyri tey. Børnini eiga at vera í einum umhvørvi, har tey mennast best og fáa størst frælsi at spæla og læra. Nevndin er samd um, at tað er ikki best fyri børnini bara at seta skúlaaldurin niður. Nevndin sær ikki, at fólkaskúlin er innrættaður til 5 og 6 ára gomul børn við teimum skipanum, sum vit kenna. Nevndin metir, at tað er á markinum við galdandi lóggávu, at ein kommuna tekur burtur møguleikan hjá børnum at ganga á dagstovni og í staðin skipar eitt tvungið forskúlatilboð. Tað er sum so einki í vegin við, at børn fara í forskúla, um foreldrini meta, at tað er tað rætta fyri sítt barn. Royndir vísa tó, at børn um 6 ára aldur eru sera ymiskt fyri í síni menning, og tí eigur tað at vera eitt frítt val, sum foreldrini hava, og ikki ein kommunal avgerð, sum ikki tekur atlit fyri menningini hjá einstaka barninum. Hetta fara vit at hoyra nógv meira um komandi tíðina.

## Námsfrøðiligu vangamyndirnar / Pedagogisku profilarnir

Pedagogisku profilarnir, sum Rógvi Thomsen hevur skrivað fyri okkum, eru lagdir fram á álitisfólkafundi og á limafundum kring landið. Fundirnir hava verið væl vitjaðir, og gott kjak hevur verið um profilarnar. Nú tilfarið er lagt fram fyri limirnar, verður tað endaliga staðfest á aðalfundinum, at hetta eru pedagogisku profilarnir hjá Føroya Pedagogfelag.

## Umboð í morgunsendingini í Kringvarpinum

Beinta Dalbø, námsfrøðingur, luttekur á fyrimyndarligan hátt í føstum tátti í „Góðan morgun Føroyar" og fegnast vit um at hava fingið eina rødd í útvarpsmiðilin, har hon svarar fyrispurningum frá lurtarum. Vónandi fer hesin táttur at halda á fram hóast sparingarnar í Kringvarpinum.

## Norðurlendskt samstarv

Fastir fundir eru í norðurlendska samstarvinum bæði á dagstovnaøkinum NLS og á sosialpedagogiska økinum NFFS. NFFS legði ein fund í Føroyum, og tað fegnast vit um. Ein yvirlýsing varð send miðlunum um „Børn sum vaksa upp í fátækadømi."

Norðurlendska samstarvið fevnir eisini um luttøku á altjóða ráðstevnum.

## BUPL/SL – kongress

Annaðhvørt ár hava systurfeløg okkara SL og BUPL kongress, sum eru teirra yvirskipaðu aðalfundir. Formaðurin er boðin við til hesar fundir, og er tað sera læruríkt at luttaka sum eygleiðari. Umboð úr øðrum Norðurlondum luttaka eisini, og góðar umstøður eru fyri netverkan, sum er sera týdningarmikið innan fakfelagsarbeiðið.

## Nýútbúnir námsfrøðingar

Árligi fundurin fyri nýútbúnar námsfrøðingar varð hildin tann 5. september. Byrjað varð við einari móttøku í felagshølunum í Tungugøtu 1, og síðani var farið í Starvsmannafelagshúsið at skipa fyri fundi um limaviðurskifti v.m. Sera góð undirtøka var fyri hesum tiltaki, og gott kjak stóðst eisini burturúr. Vit ynskja okkara nýútbúnu starvsfeløgum vælkomnum sum limir í Pedagogfelagnum. Heine Lútzen greiddi frá um eftirlønarviðurskiftir og samlagstrygging.

## Hjálparfólkaútbúgving

Forkvinnan hevur luttikið í einum arbeiðsbólki, sum hevur havt til uppgávu at taka støðu til, hvørt ein hjálparfólkaútbúgving skal setast á stovn. Arbeiðsbólkurin kom við ymiskum uppskotum um, hvussu ein tílík útbúgving kann skipast, men úrslitið varð, at landsstýrismaðurin ikki ynskti at raðfesta hetta arbeiðið høgt í løtuni, og arbeiðið var tískil steðgað. Nær hetta arbeiðið verður tikið uppaftur, er ikki vist, men Pedagogfelagið hevur gjørt greitt, at hetta arbeiðið ikki kann skundast ígjøgnum, men krevur gjølla viðgerð og stórt umhugsni, skal tað eydnast.

## Leiðararáðið

Árligi landsleiðaradagurin var hildin 12. oktober á Hotel Hafnia, har navnframi danin, organistiónsteoretikarin og fyrilestrahaldarin Steen Hildebrandt hevði fyrilestur undir heitinum „Burðardygg leiðsla – leiðsla við hjartanum". Ein framúr góður dagur, sum endaði við tónleiki frá Sámali Ravsnfjall og einum góðum døgurða, har Fríðhild Winther undirhelt við sínum bersøgna skemti. Góð undirtøka var fyri degnum, og tað var ein sera vælhýrdur professari, sum fylti dagin við sínum vísu ástøðum.

Leiðararáðið skipaði fyri einum fyrilestri við Suna Poulsen um A- og B- menniskju og um krøv, sum samtíðin setir okkum.

Súsanna Olsen hevði ein fyrilestur um leiðslu á árliga leiðararáðsdegnum, har tvey upplegg eisini vóru um, hvørt leiðarar framhaldandi skulu vera limir í Pedagogfelagnum, ella um teir skulu skipa sítt egna felag uttan fyri Pedagogfelagið.

## ALS

Fundir hava verið við umboð frá ALS um, hvørjir møguleikar eru fyri, at limir, sum eru arbeiðsleysir, kunnu koma skjótt út í arbeiði aftur. Umrøtt hevur verið, hvørt ALS kann skipa fyri skeiðum fyri arbeiðsleysar limir, og hvørjir møguleikar annars eru í skipanini.

## 1. mai

Forkvinnan helt 1. mai-dagsrøðu á Vaglinum í ár, har fitt av fólki var samlað.

## Talufrælsi

Felagið hevur aftur í ár fleiri dømi um, at limir halda seg aftur ella ikki vita, hvørt tey kunnu gera vart við seg ella úttala seg í sambandi við sítt arbeiði. Limir ivast viðhvørt í, um tey kunnu venda sær til felagið, ella um tey kunnu gera vart við síni arbeiðsviðurskifti meira alment. Tað er umráðandi, at starvsfólk kenna seg trygg við at varpa ljós á síni arbeiðsviðurskifti, bæði tá tað gongur við, og tá tað gongur ímóti. Umráðandi er at kenna mannagongdirnar og at verja borgaran og harvið minnast til sínar skyldur. Her eru bæði tagnarskyldan og fráboðanarskyldan galdandi. Starvsfólk hava víðkaða fráboðanarskyldu, um tey gerast varug við viðurskifti, sum ikki eru góð fyri borgaran, antin tað eru børn, ung ella vaksin.

## Flokkingar

Felagið hevur gjørt tvær nýggjar flokkingar:

- Námsfrøðiligir ráðgevarar
- Nýggju eindar- og varaeindarleiðarastørvini í Almannaverkinum

## Rættarmál

Mál, sum koma fyri Fasta gerðarrættin í nærmastu tíð:

Eitt mál er um uppsøgn av varaálitisfólki í Almannaverkinum.

Eitt er um lønarviðurskifti hjá fakligu leiðarunum í stuðulstænastunum fyri vaksin. Hetta málið er reist saman við Starvsmannafelagnum, Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum og Egroterapeutfelagnum.

Eitt mál er ávegis um førleikaviðbøtur til leiðarar í Tórshavnar kommunu.

Felagið hevur tikið upp málið um starvsaldur aftur, har felagið vil hava greiðu á, hvussu stigatalsskipanin skal handfarast.

Føroya Pedagogfelag hevur stevnt Vágs kommunu fyri Føroya Rætt vegna brot á Dagstovnalógina og fyri ólógliga at hava sagt tríggjar leiðarar úr starvi.

## Løgtingsins umboðsmaður

Felagið reisti eitt mál fyri umboðsmannin um handfaringina av einum máli um starvsaldur hjá einum limi, sum starvast í Tórshavnar kommunu. Kommunan fekk álvarsliga átalu fyri handfaringina, og limurin fekk sína løn.

Felagið hevur lagt eitt annað mál fyri løgtingsins umboðsmann um handfaringina hjá Mentamálaráðnum av einum máli, har tey hava noktað at viðgera eina kæru vegna ein lim, sum misti starv sítt í Tórshavnar kommunu. Umboðsmaðurin hevur heitt á Mentamálaráðið um at syrgja fyri at taka kæruna upp og viðgera hana.

## Fundir við aðalráðini

Fundir hava verið við Almannamálaráðið, Anniku Olsen um bygnaðarbroytingarnar í Almannaverkinum

Fundir hava eisini verið við Bjørn Kallsø um ymisk viðurskifti, so sum Dagstovnaráðið, forskúlar, fulltrúastarvið sum hvarv, ískoytisútbúgving, hjálparfólkaútbúgving v.m.

## Aktións- og upplýsingargrunnurin

Tað hevur ikki verið møguligt hjá nevndini fyri grunnin at veita nakran stuðul úr grunninum orsakað av fíggjarstøðuni hjá grunninum eftir verkfallið.

Nevndin fyri grunnin hevur arbeitt við einum uppskoti at leggja fyri aðalfundin um, hvussu vit kunnu økja inngjaldið í grunnin og skipa hann í framtíðini í mun til upplýsingararbeiði. Uppskotini, sum nevndin er komin við, verða løgd fyri aðalfundin til støðutakan.

# Friðarval um nevndarsessir

Orð: Ingolf S. Olsen

*Val er um tveir nevndarsessir á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag. Talan er um sessirnar hjá Elini N. W. Tausen og Guðruni Eysturlíð. Elin tekur við afturvali, men ikki Guðrun. Bert ein nýggjur kandidatur, Wenzel S. V. Olsen, hevur boðið seg fram til nevndarvalið, og sostatt er greitt frammanundan aðalfundinum, at hann er nývaldur. Eftir aðalfundin sær nevndin sostatt soleiðis út: Maud Wang Hansen, forkvinna, Jógvan Philbrow, Jannie Jacobsen, Elin N. W. Tausen og Wenzel S. V.Olsen.*





# Áhugin hevur flutt seg

*Tá Elin N. W. Tausen stillaði upp til nevndina í Føroya Pedagogfelag fyri tveimum árum síðani, var tað serliga tann pedagogiskt fakligi áhugin, ið dróg. Tann áhugin er als ikki burtur, men í sjálvum nevndararbeiðnum er áhugin fyri tí fakfelagsliga arbeiðnum vaksin munandi.*

Orð: Ingolf S. Olsenh



Títtar samráðingar og eitt verkfall hava eyðkent hetta fyrsta nevndarskeiðið hjá Elini N. W. Tausen, so líkindi hava verið fyri annaðhvørt av álvara at gerast burtur í hesum tradisjonella partinum av fakfelagsarbeiðinum ella at renna skrìggjandi á dyr.

Men fyri Elina hevur tað fyrra gjørt seg galdandi.

„Í fyrstuni, eisini tá eg í skeiðinum frammanundan var inni sum varanevndarlimur, var tað serliga tað pedagogiska yrkið – fakligheitin – og tað at gera okkum sjónligari í samfelagnum, ið hevði størsta áhugan í nevndararbeiðinum. Men hetta er broytt. Nú havi eg meira fokus á umstøðurnar hjá okkara limum at útinna sína fakligheit og fremja sítt yrki: Sálarliga arbeiðsumhvørvið, fysisku karmarnir og sjálvandi lønin og pensjónsviðurskiftini," sigur Elin.

Fyri einum ári síðani endaðu sáttmálasamráðingarnar við verkfalli, sum vardi í 22 dagar. Úrslitið var, at námsfrøðingarnir fingið 220 krónur oman á lønarkarmin og staðfest í sáttmálanum, at teir hava rætt til fyrireikingartíð. Tað hevði eisini stóran týdning, at at kalla allir limirnir fingu lut í lønarhækkingini, hóast Fíggjarmálaráðið hevði kravt differentiering, soleiðis at bert tær lægstu lørnirnar skuldu lyftast.

„Tað kann gott vera, at úrslitið ikki sær so stórsligið út, men vit hava ikki sæð effektina av úrslitinum enn. Tað síggja vit ikki, fyrr enn fyrireikingartíðin er væl og virðiliga sett í verk á arbeiðsplássunum," sigur Elin.

## Rúm fyri hægri løn

Hon ivast ikki í, at lønar- og eftirlønarkrøvini eisini eisini fara at viga tungt í heyst, tá sáttmálasamráðingar aftur verða.

„Eg eri vís í, at tað er rúm fyri at lyfta okkum nærri upp at tí lønarlagnum, sum vit eru verd. Millum annað skulu hjálparfólkini hálast upp. Tey eru lægst lønti bólkur í samfelagnum, og lønin stendur langt frá mát við tá ábyrgd, tey hava", slær Elin fast.

Hon heldur, at intensiteturin í nevndararbeiðinum hesi tvey árini orsakað av sáttmálasamráðingum og verkfalli hevur givið nevndararbeiðinum ein eyka vinning, nevniliga meira dynamikk.

„Eitt verkfall við øllum, sum tí hoyrir til, ger nakað við orkuna. Sjálvandi fer tað við nógvari orku, so tað ikki verður gjørt nógv við nakað annað, so leingi tað varar. Men tað skapar eisini ein dynamikk, og kunsturin er at draga hann at sær og varðveita hann. Tað hevur týdning, tá vit skulu arbeiða við opinlekina og styrkja samskiftið millum nevnd og limir. Vit hava brúk fyri dynamikki, tá vit skulu menna mannagongdir og annars fáa innanhýsis arbeiðið í felagnum at virka so væl, sum til ber, og tá vit skulu birta undir kjak millum limirnar og skapa áhuga fyri okkara yrki úti í samfelagnum," staðfestir Elin.

Í so máta ganga fakligu og fakfelagsligu áhugamálini hond í hond.

„Tær fakligu tilgongdirnar taka ofta langa tíð, so tað er gott við eyka dynamikki av og á, ikki soleiðis at skilja kortini, at vit skulu ynskja okkum verkføll. Til dømis var tilgongdin at fáa sett orð á tær føroysku námsfrøðiligu vangamyndirnar sett í gongd í 2009, og nústani verður seinasta hond løgd á tað arbeiðið. Ein onnur faklig tilgongd er kjakið um námsfrøðina fyri tey seks ára gomlu, fyri og ímóti forskúlum, og tað kjakið er nústani av álvara byrjað," greiðir Elin frá.

## Grunnur má fyllast

Eitt av hennara høvuðsábyrgdarøkjum í nevndini í Føroya Pedagogfelag er upplýsingargrunnurin, sum eisini er verkfalsgrunnur.

„Tað er sjálvsagt, at verkfallið var dýrt fyri grunnin, men nú mugu vit royna at fylla hann skjótt aftur, so hann eisini kann fara at virka sum upplýsingargrunnur aftur. Tí verður skotið upp fyri aðalfundinum at hækka inngjaldið í grunnin," sigur Elin.

Hon leggur dent á, at tað hevur stóran týdning við góðum upplýsingararbeiði um námsfrøði og námsfrøðiliga arbeiðið bæði innanhýsis í felagnum og úti í samfelagnum.

„Tað nyttar ikki at kopiera tað, onnur gera og teirra royndir, tí vit eru øðrvísi sum fakøki. Soleiðis er námsfrøði. Føroyingar speglast aftur í okkara máta at arbeiða námsfrøðiliga uppá og øvut. Eitt er, at námsfrøðin alla tíðina broytist og lagar seg til broytt viðurskifti. Sostatt er stórur munur á námsfrøðini nú og fyri 30 árum síðani, tá Føroya Pedagogfelag varð stovnað. Eitt annað er, at eisini frá samfelag til samfelag, øki til øki, ja enntá frá einum stovni til annan eru stórir munir. Tí er tað so neyðugt við einum støðugum og málrættaðum upplýsingararbeiði," staðfestir Elin.



## Fakta:

Elin N. W. Tausen, 39 ár.

Í 2009 varð hon vald í nevndina í Føroya Pedagogfelag sum varafólk. Sum varafólk hevði hon sæti í nevndini frá mai 2009 til mars 2010 og aftur frá oktober 2010 til mars 2011, tá hon var vald í nevndina.

Elin býr saman við manni sínum Hans Tausen á Argjum, og tey eiga børnini Marni, 19 ár, Marta, 16 ár, og Ester, 9 ár.

Elin varð í august í fjør sett sum leiðari á Dagstovninum í Løkjatúni á Argjum, har hon síðani desember 2010 hevði verið virkandi leiðari. Til tá hevði hon arbeitt sum námsfrøðingur á stovninum, síðan hon í februar 2008 var útbúgvin námsfrøðingur frá Føroya Læraraskúla.

# Serstovnaøkið fær eitt umboð

*Nýggi nevndarlimurin Wenzel S. V. Olsen av Toftum vil stríðast fyri at fáa betri skil á serstovnaøkið, sum hann á nógvum økjum heldur verða óskipað í dag. Hann vil eisini hækka grundlønina og økja um møguleikarnar hjá námsfrøðingum og hjálparfólki at arbeiða yvir.*

Orð: Ingolf S. Olsen


Wenzel S. V. Olsen

Tá nýggja nevndin í Føroya Pedagogfelag tekur við eftir aðalfundin, fær hon enn eitt umboð fyri serstovnaøkið, nevniliga Wenzel S. V. Olsen úr Saltangará. Í sitandi nevnd er tað bara forkvinnan, Maud Wang Hansen, ið kemur frá serstovnaøkinum.

Arbeiðsplássið hjá honum er verkhúsið Stíggjur í Saltangará, og Wenzel dylir ikki, at tað serliga er serstovnaøkið, ið liggur honum fremst í huga, nú hann gjørdi av at stilla upp til nevndina í Pedagogfelagnum.

„Serstovnaøkið er ógvuliga óskipað og óregulerað í mun til dagstovnaøkið, bæði tá tað snýr seg um støddirnar á stovnunum, normeringarnar og fysisku karmarnar. Hesi viðurskifti vil eg fegin verða við til at betra um," sigur Wenzel.

## Grundlønin skal upp

Lønarviðurskiftini liggja eisini frammarlaga í huganum á Wenzeli.

„Grundlønin er alt ov lág, og tað er henni, vit eiga at fara eftir í næstu sáttmálasamráðingum heldur enn viðbótum og øðrum, ið kann pynta um karmin. Men undanfarnar samráðingar hava víst, at tað er torført at samstarva við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið," staðfestir hann.

Wenzil heldur avloysaraskipanina vera alt ov stirvnað og vil arbeiða fyri, at tað skal verða betri rúm fyri at arbeiða yvir.

„Tað er sera torført at fáa avloysarar, tí eingin tímir at vera tøkur til so óstøðugt arbeiði, tá avloysaralønin er so lág. Fyrimunurin við at lata meira upp fyri yvirarbeiði er, at tá verða tað roynd og oftast útbúgvin fólk, ið loysa av, umframt sjálvandi, at tað hjá nógvum er kærkomið at fáa møguleikan at vinna sær nakrar eyka krónur", sigur Wenzel.

## Atlit til brúkarar og samfelag

Tá tað kemur til sjálva námsfrøðina, skal hon altíð í fyrsta lagi hava støði í tørvinum hjá barninum ella stovnsbrúkaranum, men samstundis er eisini neyðugt at taka samfelagslig atlit, heldur hann. Hetta er millum annað galdandi, nú fyrstu forskúlarnir her heima hava sæð dagsins ljós, og kjakið um teir av álvara er kyknað.

„Børnini og stovnsbrúkararnir á serstovnaøkinum koma í fremstu røð, men vit kunnu kortini ikki bara lata eyguni aftur fyri, at samfelagið setur nøkur krøv, sum vit so eisini mugu royna at lúka."

„Tá tað kemur til forskúlarnar, so er tað keðiligt, um tað skal enda í eini varandi stríðsstøðu millum námsfrøðingar og lærar og innanhýsis í hesum fakbólkunum. Samfelagið tykist vilja fara handavegin, har námsfrøðin breiðir seg støðugt meira inn á skúlaøkið. Hetta mugu námsfrøðin og vit námsfrøðingar laga okkum til. Aðrastaðni, eitt nú í Danmark, eru forskúlar væl umtóktir. Tað, sum vit so mugu gera her heima, er at finna út av og definera, hvat ein føroyskur forskúli er og eigur at vera," sigur Wenzel.

Onkuntíð hevur verið róð fram undir, at kjakið um forskúlarnar bert er eitt stríð millum lærarar og námsfrøðingar um arbeiðspláss.

„Tað haldi eg ikki, at tað er, men annars er einki skeivt í at hugsa eitt sindur í arbeiðsplássum eisini, tí fækkast námsfrøðiligu arbeiðsplássini støðugt, so gongur tað fyrr ella seinni eisini út yvir sjálva námsfrøðina," slær Wenzel fast.

## Persónligur áhugi

Tað var persónligi áhugin at arbeiða við fólki við menningartarni, ið fekk Wenzel at velja pedagogikkin og serstovnaøkið sum sína lívsleið.

„Eg havi altíð havt fólk við menningartarni í mínum nærumhvørvi, og mær dámar sera væl at arbeiða við teimum og vera saman við teimum," sigur hann.

Áhugin er so stórur, at stórur partur av frítíðini eisini fer til at vera saman við teimum menningartarnaðu. Hann er nevniliga ein undangongumaður í felagnum Svani, sum er ítróttarfelagið hjá teimum menningartarnaðu í Eysturoynni. Wenzel er eisini næstformaður í felagnum.

Umframt áhugan fyri fakfelagspolitikki, sum Wenzel nú er vorðin virkin í, so hevur hann eisini stóran áhuga fyri landspolitikki. Hann stillaði upp fyri Javnaðarflokkin til seinasta løgtingsval og hevur ikki slept ambitiónunum um einaferð at røkka inn á ting.

„Eg gangi ikki og hugsi so nógv um tað, men eg eri rættiliga áhugaður í samfelagsviðurskiftum og eri enn á javnaðarlistanum her inni. So fáa vit at síggja", sigur Wenzel

## Fakta:

Wenzel S. V. Olsen, 32 ár.

Wenzel býr saman við unnustuni Elsebeth Djurhuus í Saltangará, og saman eiga tey synirnar Jósef, 6 ár, og Jónas, 2 ár.

Í februar 2010 varð hann útbúgvin námsfrøðingur frá Føroya Læraraskúla, og í mars sama ár varð hann settur í starv sum námsfrøðingur í Verkhúsinum Stíggi í Saltangará, har hann enn arbeiðir.





# Tað skal eydnast

*Økið fevnir um góðan triðing av samlaðu fíggjarlógini, 16.000 brúkarar og 1700 starvsfólk. Snøgt sagt hvørja familju í landinum. – Avbjóðingin er stór, men gera vit tingini rætt, so fær borgarin eina munandi betri tænastu. Tað sigur Petra Johnsdóttir Joensen, sum brúkar orðini stuttligt og avbjóðandi til at svara spurninginum, hví hon yvirhøvur tímir uppgávuna at endavenda Almannaverkinum.*


Petra Johnsdóttir Joensen

Orð: Jón Brian Hvidtfeldt

Stakkurin við pappírum, diagrammum og grafum fjalir skjótt fundarborðið á stjóraskrivstovuni á Smyrilsvegi 20 í Havn. Tey vísa gamla bygnaðin, nýggja bygnaðin og tilgongdina harímillum. Petra Johnsdóttir Joensen peikar, blaðar og greiðir frá, hvussu gamla Almannastovan og gamla Nærverkið í hesum døgum verða kókað saman í ein nýggjan stovn við fimm deplum.

– Heimatænastuna valdu vit at halda uttanfyri, tí eldraøkið eftir ætlan skal leggjast út til kommunurnar. So har eru ongar broytingar fyri fyrst. Men alt hitt verður broytt, skundar hon sær at skjóta inn í samrøðuna.

Tilgongdin millum gamla og nýggja bygnaðin hevur nú skjótt vart í eitt ár. Í mai í fjør varð boðað frá, at øll leiðslustørvini verða niðurløgd, nýggj og færri leiðslustørv lýst leys, meðan øll onnur størv verða umskipað. Heimatænastan er sum longu nevnt uttanfyri, so boðini raktu umleið 800 fólk. Eingin varð tó uppsagdur.

Petra Johnsdóttir Joensen peikar á eitt pappír, sum minnir um eitt umsóknarblað.

– Her fái eg at vita frá starvsfólkunum, innan hvørji øki tey kunnu hugsa sær at arbeiða í framtíðini. Eg havi fingið umleið 200 av hesum oyðubløðum á mítt borð. Tað er fínt, tí tað eru hesi umleið 200, sum eru fyri størstu, bygnaðarligu broytingum. Hinvegin er ikki neyðugt hjá fólki, sum til dømis arbeiða á einum stovni og framhaldandi ætla sær at vera har, at lata inn oyðublað við ynskjum um arbeiðsøki.

Freistin at lata inn oyðibløðini var úti 5. februar, og Petra Johnsdóttir Joensen hevur verið ígjøgnum tey øll.

– Flestu ynskja at arbeiða innan sama øki, hóast tey verða plaserað øðrvísi í nýggja bygnaðinum, og tað er sera gott. So koma vit skjótt ígongd, sigur hon avgjørd.

Men hervið er tó ikki komið á mál við at fáa mongu starvsfólkini at fóta sær í nýggja Almannaverkinum. Tað venda vit aftur til.

## Petra via video

Almannaverkið er við sínum 1700 starvsfólkum at rokna sum størsta arbeiðspláss í landinum. Og hóast heimatænastan varð hildin uttanfyri bygnaðarbroytingarnar, so eru rættuliga nógv eygu og oyru kring alt landið, ið skulu taka ímóti boðunum av ovastu rók. Petra Johnsdóttir Joensen hevur svarið klárt:

– Tá talan hevur verið um reina kunning, so havi eg brúkt video á intranetinum. Á tann hátt fáa øll somu kunning í senn. Øll hoyra tað sama, og harvið minkar vandin fyri misskiljingum og gitingum.

Spurd, hvussu hon so uppfangar reaktiónirnar til ta kunning, ið verður send út, svarar stjórin:

– Eg brúki leiðararnar á ymsum deildunum og eisini álitisfólkini. Eg tosi nógv við tey, spyrji tey. Og so hava starvsfólk møguleika at skriva til mín. Tað velja nógv at gera, og so fái eg reaktiónirnar tann vegin eisini.

Petra Johnsdóttir Joensen argumenterar fyri leistinum, ið sæð uttanifrá kann virka eitt sindur ópersónligur.

– Vit byrjaðu við kjakfundum. Men fatanin bleiv, at ein lukkaður „kredsur" í Havn kjakaðist, meðan hini kring landið stóðu uttanfyri og bara frættu brotbitar av innihaldinum. Tað elvir sjálvandi til gitingar og misnøgd. So til beinleiðis kunning er video besta amboðið fyri okkum, sigur Petra Johnsdóttir Joensen.

Stjórin skundar sær tó at leggja afturat, at í tilgongdini er eisini pláss fyri kjaki og felagsfundum.

– Vit hava til dømis leigað Evangeliehúsið til felagsfund, og 22. januar høvdu vit eitt stórt, felags tiltak í Østrøm, har allir leiðararnir høvdu framløgur um síni øki.

Petra Johnsdóttir Joensen leitar í pappírsrúgvuni, til hon finnur ein fínan faldara við yvirskriftini AV Match.

– Her møttu 500 fólk, og øll fingu tey kunning og høvi at seta spurningar til sítt øki, sigur hon og blaðar í faldaranum, ið lýsir nýggja bygnaðin, deplarnar og hvørjar uppgávur liggja hvar.

Hon tykist sannførd um, at hennara leistur er tann rætti.

– Fyri meg hevur tað týdning at geva greið boð, og so fylgi eg upp saman við mínum leiðarum.

Men samstundis hava leiðararnir sjálvir verið í eini tilgongd, har teirra størv vórðu niðurløgd og umskipað til nýggj, men færri leiðarastørv. Ber tá til at brúka leiðararnar sum erlig og trygg bindiliið til starvsfólkini?

– Ja, eg eri greið yvir, at leiðararnir hava verið ótryggir. Mín uppgáva er tí at práta við tey. Vera skiljandi, svarar Petra Johnsdóttir Joensen.

## Ótrygt á rókunum

Ein av uppgávunum í bygnaðarbroytingunum er at kóka umleið 50 leiðarastørv niður í 25. So sjálvt um allir, verandi leiðarar halda fram í nýggjum leiðarastarvi, leypir framvegis helvtin av.

– Hini, sum ikki halda fram sum leiðarar í nýggja bygnaðinum, gera vit avtalur við. Tey fara inn í nýggj øki í Almannaverkinum at arbeiða, men verða annars viðfarin sum um tey eru uppsøgd. Tað merkir, at tey varðveita leiðaraløn í hoyrings- og uppsagnartíðini.

Petra Johnsdóttir Joensen steðgar á eitt bil.

– Her eru vit ikki komin á mál enn. Vit hava ikki fingið øll uppá pláss enn, staðfestir hon.

Nakrir av gomlu leiðarunum hava leitað sær onnur størv, uttan fyri Almannaverkið, meðan onnur enn ikki kenna sína framtíð. Men hvat ger ein stjóri við 25 leiðarar, sum í princippinum eru vrakað?

– Vit práta. Stovnurin bjóðar sálarfrøðiliga hjálp. Men annars tosa vit um tað og vísa umsorgan. Hesi viðurskifti eru sum nevnt ikki komin uppá pláss enn. Men tað skal koma uppá pláss nú í februar-mars, sigur Petra Johnsdóttir Joensen.

Í uppgávuni liggur, at alt stovnsøkið undir tí gamla Nærverkinum skal skipast av nýggjum.

– Ja, vit skulu seta nýggjar leiðarar, sum koma at hava ábyrgd av fleiri stovnum.

Hví er tað betri?

– Tað gevur eitt betri fakligt umhvørvi, og í síðsta enda eina betri tænastu fyri borgaran.

Petra Johnsdóttir Joensen er greið yvir, at fysiska frástøðan kann gerast ein trupulleiki, tá sami leiðari hevur ábyrgd av fleiri stovnum.

– Jú, men her koma vit at seta samskiparar úti á stovnunum. Teir eru tó ikki settir enn.

Kann tað í praksis ikki geva uppaftur fleiri leiðarar, formellar leiðarar ovast og óformellar leiðarar úti á hvørjum stovni?

– Jú, tað kanst tú siga. Tað er so avbjóðingin at syrgja fyri, at tað ikki verður úrslitið.

Hvussu?

– Her mugu vit brúka styrkta, fakliga umhvørvið til at tackla slíkar støður, sigur Petra Johnsdóttir Joensen avgjørd.

## Drívmegin

Sambært definitiónunum í almennu setanarreglunum er Petra Johnsdóttir Joensen komin at pensjónsaldri. Men í staðin fyri at seta ferðina niður, er hon farin øvugtan veg.

– Eg geri tað, tí eg haldi tað vera stuttligt, sigur Petra Johnsdóttir Joensen.

Svarið kemur eins spontant og láturin, tá vit spyrja, hví hon ger hetta, heldur enn at trappa niður. Stjórin heldur fram:

– Tað er eisini ein stór avbjóðing. Men eg trúgvi uppá, at hetta er rætti vegurin at fara. Tað er mín motivatión.

Petra Johnsdóttir Joensen hevur hug at bera seg undan spurninginum, um hon er typan við ísi í maganum.

– Hetta krevur fokus. Fult og heilt, ljóðar svarið.

Gjøgnum samrøðuna hevur hon alla tíðina blaðað og peika í pappírsrúgvunum á stjóraborðinum. Tað er kortini ikki vegna manglandi fokus, einans av pedagogiskum ávum mótvegis undirritaða:

– Nei, hatta havi eg alt í høvdinum, svarar hon stutt spurninginum, hvussu til ber at varðveita fokus í einari so rúgvusmiklari bygnaðarbroyting.

– Eg kann viðhvørt vera móð. Men eg havi ongantíð angrað, at eg fór undir uppgávuna. Ongantíð. Hetta er rætt at gera, tí hetta gevur borgarunum eina betri tænastu, sigur Petra Johnsdóttir Joensen.

Stjórin peikar á týdningin av tí nógv umrøddu „einu hurðini“, sum borgarin skal hava inn í Almannaverkið. Vísir á, at 80 prosent av brúkarunum kunnu avgreiðast skjótt, 15 prosent hava ein meira samansettan tørv, meðan síðstu fimm prosentini hava ein tungan tørv.

– Við røttum mannagongdum og flow í arbeiðnum skapa vit eina heildartænastu, sum beinanvegin metir um og tekur støði í tørvinum hjá tí einstaka. Vit finna útav, um borgarin kann avgreiðast beinanvegin, ella tørvurin er meira samansettur. Avbjóðingin er at fáa kvalificerað fólk at standa fremst í organisatiónini, soleiðis at borgarin bara hevur fyri neyðini at venda sær til ta einu hurðina, sigur Petra Johnsdóttir Joensen.

Leisturin við tí einu hurðini til borgaran verður royndarkoyrdur frá mars mánað, og skal virka til fulnar í summar.

## Tíðarætlan glíður

Í rúgvuni við pappírum, diagrammum og grafum á fundarborðinum er eisini ein tíðarætlan, sum sigur at alt skal vera klárt 1. mars. Ein tíðarætlan, sum longu er skumpað nakrar ferðir, ásannar stjórin.

– Nei, tíðarætlanin hevur ikki hildið heilt. Málið var, at alt skuldi vera liðugt um ársskiftið. Men nøkur viðurskifti hava tikið longri tíð enn upprunaliga mett, og tað er í lagi, sigur Petra Johnsdóttir Joensen og nevnir sum dømi, at nakrar starvssetanir hava drigið út.

Eitt nú hevði hon ikki roknað við, at tað fór at vera neyðugt at lýsa størvini sum eindarleiðarar alment leys at søkja. Men tað bleiv so gjørt eftir kravi frá fakfeløgum.

– Tað er fínasta slag, men hitt hevði verið skjótari, sigur Petra Johnsdóttir Joensen.

Balansan millum at halda tíðarætlan og atlitið til formligar og fólkaligar mannagongdir er tó alla tíðina har.

– Málið er, at vit eru liðug at plasera fólk í mars mánað. Síðani implementera vit fram til summarferiuna, og so brúka vit restina av árinum til at arbeiða allar mannagongdirnar uppá pláss. So koyrir tað, sigur Petra Johnsdóttir avgjørd.

Tað er skjótt eitt ár síðani, at boðað var frá, at øll leiðslustørvini verða niðurløgd og øll onnur størv, Heimatænastan undantikið, verða umskipað.

– Boðini vóru greið. Hetta er ikki eitt spariumfar, men bygnaðarbroytingar. Síðani hevur tú ikki hoyrt meg tosa um upsøgnir. Tað er rætt, at vit hava hildið aftur við at seta fólk í starv fyri tey, sum eru farin. Men tað hevur verið við atliti til ta tilgongd, sum vit eru í júst nú.

Kann stjórin á Almannaverkinum tá vísa aftur, at uppsøgnir eru á veg í kjalarvørrinum á nýggja bygnaðinum?

– Sparingar eru allatíðina, við ella uttan bygnaðarbroytingar. Men tú hoyrir ikki meg tosa um uppsøgnir. Og eg eri ikki í holt við nakra sparirundu, svarar Petra Johnsdóttir Joensen.

Hennara avgjørda mál er at fáa bygnaðarbroytingarnar innan Almannaverkið at virka.

Men verður tað bíligari?

– Vit fáa borgaran í fokus. Vit fáa eina hurð inn í alt Almannaverkið, og harvið verður tænastan betri. Sparingar eru, sum longu nevnt, allatíðina. Við eini játtan, sum er meira enn triðingurin av fíggjarlógini, kemur Almannaverkið tí eisini at muga laga seg til fíggjarligu vánirnar í samfelagnum, ljóðar svarið frá Petru Johnsdóttir Joensen.

Hóast pensjónsaldur er hon sett í fast starv, eisini eftir at umrøddu bygnaðarbroytingar eru framdar í verki. Spurd, hvørt uppgávan eisini verður stuttlig, tá gerandisdagurin avloysir tilgongdina við bygnaðarbroytingum, svarar hon flennandi:

– Tað veit eg ikki. Tað mugu vit síggja til ta tíð.





# Maud saknar atlit til menniskjað



*Maud Wang Hansen*

*Vit arbeiða við menniskjum og menniskjaligum relatiónum, og tað tekur nýggi bygnaðurin ikki í nóg stóran mun atlit til. Tað sigur forkvinnan í Føroya Pedagogfelag, sum síðsta lítla árið hevur havt 600 limir, mitt inni í umfatandi bygnaðarbroytingunum í Almannaverkinum.*

Hvat gert tú sum fakfelagsforkvinna, tá triðingurin av limunum gerast partur av somu bygnaðarbroytingum. Ein støða, sum Maud Wang Hansen hevur verið í síðsta, lítla árið.

– Longu tá politiska avgerðin um at leggja saman Almannastovuna og Nærverkið varð tikin, fingu vit at vita, at vit sum fakfelag fóru at vera hoyrd. Og jú, vit hava verið á fundum, og vit hava sæð nógvar powerpoint framløgur, staðfestir forkvinnan í Pedagogfelagnum.

Í dag eru stóru linjurnar í bygnaðarbroytingunum innan Almannaverkið teknaðar upp, virkis-diagrammini komin uppá pláss og yvirskipaða leiðslan sett. Men Maud Wang Hansen er tó framvegis skeptisk. Alt er framvegis ov yvirskipað, meðan smálutirnir framhaldandi lata bíða eftir sær at koma uppá pláss. Og tað er slítandi.

– Fólk hava eftirhondini gingið í óvissu í rættuliga langa tíð. Í somáta hava starvsfólkini verið fantastisk, tey hava verið tolin og hava lagað seg til støðuna, sigur Maud Wang Hansen.

## Nærverandi leiðsla

Stóri ivin hjá forkvinnuni í Pedagogfelagnum, nú hon hyggur eftir nýggja bygnaðinum í Almannaverkinum, er frástøðan millum leiðslu og starvsfólk. Alt stovnsøkið er skipað av nýggjum, og har kemur sami leiðari at hava ábyrgd av fleiri stovnum.

– Vit síggja hesi dømini um stovnar, har leiðarin ikki er til staðar, men situr onkra aðrastaðni. Tað fær mínar ávaringarlampur at ringja, sigur Maud Wang Hansen og heldur fram:

– Hvussu kanst tú kenna ein stovn, starvsfólkini og ikki minst brúkararnar, um tú ikki ert til staðar? Tað letur seg ikki gera.

Forkvinnan í Pedagogfelagnum argumenterar fyri týdninginum av leiðslu á staðnum.

– Vit mugu ikki gloyma, at vit hava við menniskju at gera. Og millum menniskju standast støður, ið hond má takast um. Tað kanst tú ikki gera, um tú ikki ert til staðar, sigur Maud Wang Hansen, sum óttast avleiðingar sum óformellar leiðslur á stovnunum, ið aftur kunnu skapa gróðrarbotn fyri konfliktum og øðrum trupulleikum.

– Slíkt er slítandi fyri allar partar, og tí skulu vit helst ikki koma í hesar støður, staðfestir hon.

Úr sínum fakfelagsstóli óttast Maud Wang Hansen snøgt sagt, at samstarvstrupulleikar og aðrir trupulleikar, sum longu eru partur av arbeiðsplássunum, koma at økjast, tá eingin leiðari er sjónligur á brúnni.

## Lunkað loysn

Argumentið hjá Almannaverkinum fyri leistinum er, at tað gevur betri fakligt umhvørvi millum leiðararnar, og í síðsta enda eina betri tænastu til borgaran. Úti á stovnunum skulu so setast samskiparar.

Leisturin er eitt sindur ringur at svølgja hjá Maud Wang Hansen. Til tað eru ivaspurningarnir ov nógvir.

– Stóri spurningurin er sjálvandi, hvørjar uppgávurnar vera. Ein samskipari skal væl saktans ikki vera ein leiðari, men hvat liggur tá í starvinum, spyr forkvinnan.

Øðrumegin óttast hon, at samskipararnir reelt gerast leiðarar uttan leiðaraløn. Hinumegin óttast hon, at samskiparin fær so týdningarleysar uppgávur, at funktiónin verður nyttuleys.

Maud Wang Hansen dylir ikki fyri, at hetta eisini er ein fakfelagsspurningur í meira bókstaviligan forstand.

– Vit hava biðið okkara limir um at venda sær til felagið, áðrenn tey taka av nøkrum starvi sum samskipari. Limirnir mugu ikki átaka sær uppgávur, uttan at lønin fylgir við. Tað er okkara uppgáva sum fakfelag at tryggja, at samsvar er millum løn og arbeiðsuppgávur, sigur Maud Wang Hansen.

Hon eftirlýsir sum longu nevnt definitiónir. Hvørjar vera uppgávurnar hjá samskiparanum og hvønn leiklut skal samskiparin hava. Leisturin við samskiparum má og skal so ikki vera ein lættur máti at spara pengar, staðfestir fakfelagsforkvinnan.

## Menniskjaliga atlitið

Felags fyri flestu av hennara limum í starvi hjá Almannaverkinum er, at arbeiðið snýr seg um menniskju. Menniskju við serligum tørvi á hjálp og umsorgan.

– Klárar man at fara til hús, tá avloysarin manglar, og kann man lata uppgávuna liggja, hóast onkur annar formelt hevur ábyrgdina av henni, spyr Maud Wang Hansen.

Forkvinnan brúkar spurningarnar sum argument fyri týdningin av, at viðurskiftini á arbeiðsplássunum, hvørjum einstakum stovni, eru í lagi.

Hon hevur hug at ilskast inn á, at menniskjaliga atlitið ikki verður raðfest hægri í tilgongdini at skapa eitt nýtt Almannaverk. Higartil hevur alt verið dekan ov yvirskipað,

heldur Maud Wang Hansen og sipar aftur til støðuna úti á einstøku stovnunum.

– Vit hava heitt á Almannaverkið um at definera og lýsa uppgávurnar, soleiðis at starvsfólkini kenna karmarnar at arbeiða út frá. Vit mugu ikki gloyma, at vit arbeiða við menniskjum, brúkarum, sum hava serligan tørv. Í hesum arbeiði er neyðugt alla tíðina at fylgja upp og seta nýggj mál. Tað er ein trupul uppgáva, og hon krevur leiðslu. Sum lagt er upp til, óttist eg, at henda uppgáva kemur at bíða, tí gerandisdagurin krevur jú eisini nógv.

Maud Wang vísir á, at stovnarnir eru ymiskir, bæði tá talan er um brúkarar og starvsfólk.

– Fólk vilja hava leiðslu. Tí ber ikki til at draga leiðararnar burtur úr stovnunum, og seta samskiparar ístaðin, sum also framvegis hava eina ódefineraða uppgávu. Tað skapar ótryggleika og elvir til trupulleikar.

### Strævið ár

Forferduligt. Orðið nærum dettur úr munninum á fakfelagsforkvinnuni, tá vit biðja hana lýsa síðsta lítla árið við bygnaðarbroytingum á arbeiðsplássinum hjá 600 av hennara limum. Maud Wang Hansen peikar á yvirfladisku kunningina, sum eftir hennara tykki ikki var eitt veruligt og javnbjóðis kjak. Hon peikar á spurningarnar, sum ikki blivu svaraðir og tí noyddu fakfelagið at kæra til Almannamálaráðið. Og hon peikar á strammu tíðarætlanina, sum yvirhálar tey ivamál, ið fakfelagið vil hava uppá pláss.

– Men eg haldi, at vit í tilgongdini hava fingið justerað nøkur viðurskifti, sigur Maud Wang Hansen.

Eitt stórt pluss á hennara konto er, at stjórin á nýggja Trivnaðardeplinum, Ingun Mohr Jacobsen, hevur námsfrøðiliga bakgrund.

– Tað gevur vón um og álit á, at okkara fak eisini verður røkt og virt í nýggja Almannaverkinum, sigur Maud Wang Hansen

Leikluturin hjá Pedagogfelagnum, nú bygnaðarbroytingarnar í Almannaverkinum eru um at koma uppá pláss, er fyrst og fremst at tryggja limirnar. Bæði beinleiðis, soleiðis at arbeiðsuppgávur og løn fylgjast, umframt at arbeiðsgevarin eisini tekur hond um avleiðingarnar av sínum avgerðum. Aftur her stingur spurningurin um manglandi leiðsluna á einstaka stovninum seg upp.

– Avgerandi er, at vit sum fakfelag ikki enda sum ein rein meklara-fyritøka í konstantum trætum millum leiðslu og starvsfólk. Vit mugu hava karmarnar somikið greiðar, at tað ikki hendir, sigur Maud Wang Hansen.

Fakfelagsforkvinnan dregur á spurningin, hvørt bygnaðarbroytingarnar hava gingið ov skjótt.

– Ja, í summum førum hevur tað eftir mínum tykki gingið ov skjótt. Tað tykist, sum um man ikki altíð hevur fingið starvsfólkini við. Men spurningurin er væl altíð, nær processin er ov long, og nær er hon nóg grundig, sigur Maud Wang Hansen.








# Balansugongdin í broytingartíðum

*Eingin sigur, at tú partú skal hava ávirkan, men tú skal føla, at tú verður hoyrdur. Annars manglar eigaraskapurin, og uttan hann er projektið í vanda fyri at miseydnast. Tað sigur sálarfrøðingurin Hans Mourits Foldbo, sum sær ótryggleika og stress sum avleiðingar av bygnaðarbroytingum.*



*Hans Mourits Foldbo*

– Populert sagt, so kann man saktans vera tikin í álvara uttan at fáa rætt. Avgerandi er, at tú verður tikin í álvara, og líka so avgerandi er, at tú eisini følir, at tú verður tikin í álvara.

Sálarfrøðingurin Hans Mourits Foldbo er knappur í svarinum. Vit hava biðið hann um at greiða frá, hvat hendir, tá eitt stórt arbeiðspláss fer undir bygnaðarbroytingar. Aktuella høvið eru umfatandi bygnaðarbroytingarnar á nýggja Almannaverkinum, ið er ein samanrenning av Almannastovuni og Nærverkinum.

– Avbjóðingin er at finna balansuna millum starvsfólk, millumleiðarar og leiðslu. Øll mugu fáa kunning og verða hoyrd. Og so má arbeiðið annars gerast so skjótt sum tilber, sigur Hans Mourits Foldbo.

Hetta við balansuni hevur týdning, ikki minst tá bygnaðarbroytingarnar eru so umfatandi sum í aktuella døminum við Almannaverkinum.

– Tað kann til dømis vera mikið skilagott at miðsavna ávísar uppgávur. Men føla tey fólkini, ið sótu við uppgávunum áðrenn, nú eisini at tey eru hoyrd? Og duga millumleiðararnir nú eisini at síggja, hví teirra uppgávur verða fluttar aðrastaðni, spyr Hans Mourits Foldbo.

Sálarfrøðingurin vendir aftur til týdningin av at tey, sum í teirra arbeiði vera fyri eini broyting, eisini verða hoyrd.

– Tað snýr seg í síðsta enda um at kenna premissuna fyri avgerðini. Geri eg tað, so havi eg eisini lættari at fyrihalda meg til støðuna, sigur Hans Mourits Foldbo.

Eigaraskapur er tó langt frá tað sama sum at tveita eina støðu út til starvsfólkið at avgera.

– Tað er grundleggandi munur á at biðja starvsfólk um at taka eina avgerð og so at biðja fólk koma við síni meining. Verður meiningin tikin í álvara, so kann man saktans liva við ikki at fáa rætt.

Kunningin kann fara fram á ymiskan hátt. Almannaverkið, sum er eitt stórt arbeiðspláss, spjatt yvir landið, hevur valt at brúka video sum amboð til kunningina.

– Tú missir sjálvandi nakað av tí persónliga. Men av praktiskum orsøkum kann hetta vera neyðugt. Tá er bara týdningarmikið, at kunningin er sera greið, ljóðar metingin frá Hans Mourits Foldbo.

### Óvissan

Bygnaðarbroytingar eru oftast rættuliga ógvuslig inntriv í eitt arbeiðspláss. Inntriv, ið taka tíð, og har starvsfólk og eisini leiðarar mangan ikki kenna úrslitið frammanundan. Tilgongdin hevur óvissur við sær.

– Tað hevur stóran týdning, at fólk fáa neyva kunning beinanvegin. Kunningin skal vera somikið neyv, at fólk eisini vita, hvat síðani hendir og nær meira verður at frætta. Og syrg so fyri at fortelja fólki, hvussu tey koma víðari til nýggju uppgávurnar, ið standa fyri framman eftir bygnaðarbroytingarnar, ljóða boðini frá sálarfrøðinginum.

Hans Mourits Foldbo undirstrikar týdningin av hesi kunning:

– Uttan hesa kunning er gróðrarbotnur lagdur fyri meira ótryggleika enn neyðugt, staðfestir hann.

Sambært sálarfrøðinginum eru óvissa og ótryggleiki natúrligar avleiðingar av bygnaðarbroytingum.

– Har eru sjálvandi fleiri, sum dáma broytingar. Har hugburðurin og atferðin siga, at hóast uppgávan er ókend, so klári eg hana eisini. Men nógvum dáma tryggleikan. Har vilja fráboðanir um bygnaðarbroytingar natúrliga skapa ein ótta fyri at missa starvið, blíva degraderað ella fáa nýggjar arbeiðsuppgávur, ið tey ikki megna. Tað er púra natúrligt, sigur Hans Mourits Foldbo og heldur fram:

– Ótryggleikin kann vera sálarliga slítandi og geva symptomir uppá strongd. Tú kann hava ilt við at konsentrera teg um arbeiðið, gerast illsintur, enntá fáa ilt í búkin. Tá arbeiðir tú ikki optimalt, produktiviteturin fellur snøgt sagt.

Hann vísir á, at okkara arbeiði í dag er so stórur partur av okkara samleika, at broytingar á hesum øki nærum kunnu elva til ein eksistentiellan ótta.

– Tí hevur tað so stóran týdning, at arbeiðsplássið skapar rúmd fyri at tosa um tær broytingar, ið standa fyri framman. Tosa um tað, hoyr søgurnar, kenslurnar og upplivingarnar hjá hvørjum øðrum. Mín pástandur er at tíðin, ið tú brúkar til at tosa um broytingarnar, fæst væl og virðiliga aftur í hinum endanum, sigur Hans Mourits Foldbo og vísir á, at økt tal av sjúkrameldingum eru ikki eitt ókent fyribrigdi á arbeiðsplássum við bygnaðarbroytingum.

### Tilgongdin

Tíðarskeiðið, frá bygnaðarbroytingar verða fráboðaðar til tær verða gjøgnumførdar,

kann lættliga gerast drúgt og eisini krevjandi. Ráðini frá sálarfrøðinginum eru at brúka hetta tíðarskeið konstruktivt.

– Syrg fyri at fólk verða uppkvalifiserað til nýggju uppgávurnar. Somu fólkini skulu væl loysa uppgávurnar aftaná, so brúka tíðina til at lýsa teirra sterku og veiku síður, og lat fólk sleppa at brúka sínar styrkir. Og ger so nakað fyri at fáa hesar eindir at virka. Tað kemur jú ikki av sær sjálvum, sigur Hans Mourits Foldbo.

Hann vísir á, at útgangsstøði fyri øllum bygnaðarbroytingum væl má vera, at uppgávurnar verða loystar betri aftaná.

Bygnaðarbroytingarnar innan Almannaverkið raka rættuliga breitt. Eini 800 størv skulu umskipast, umframt at 50 leiðarastørv skulu kókast niður til 25 nýggj leiðarastørv.

– Tað, sum oftani hendir í slíkum støðum, er at starvsfólk og eisini leiðarar reagera við at vera sera varin. Eingin vil leypa framav, øll vurdera støðuna út frá egnum stóli. So her fer ikki nógv menning fram, men ístaðin verður alt meira ella minni sett á standby, sigur Hans Mourits Foldbo.

Aftur her hevur kunningin avgerandi týdning, tí hon kann varðveita álitið millum starvsfólk og millumleiðarar, sum av givnum orsøkum eru mitt í einari broytingartíð. Og so er neyðugt at skapa rúm fyri teimum frustratiónum, sum kunnu hugsast at vera.

Hóast sálarfrøðingurin vísir á, at arbeiðið við bygnaðarbroytingum skal gerast so skjótt sum tilber, so dugir hann ikki at seta tal á mánaðirnar og vikurnar.

– Nei, eg havi einki greitt svar uppá, hvussu leingi bygnaðarbroytingar mugu fara fram. Men greitt er tó, at aftaná eina bygnaðarbroyting má arbeiðsplássið fáa frið til at menna seg aftur.

Dømini um bygnaðarbroytingar, ið verða avloystar av øðrum bygnaðarbroytingum, eru sambært sálarfrøðinginum syrgilig.

– Tá verður avleiðingin, at starvsfólkini snøgt sagt missa virðingina fyri sínum arbeiðsplássi, sigur Hans Mourits Foldbo.

## Lat leiðarar leiða

Ein ivaspurningur í kjalarvørrinum á bygnaðarbroytingunum innan Almannaverkið er frástøðan millum leiðslu og starvsfólk, nú alt stovnsøkið verður skipað av nýggjum við sama leiðara við ábyrgd av fleiri stovnum.

Sálarfrøðingurin sær bæði fyrimunir og vansar við nýggja leistinum.

– Tað góða við gamla modellinum var, at leiðarin var sera sjónligur, ofta nærum partur av starvsfólkahópinum. Tað gav tryggleika millum starvsfólkini. Hinvegin kann slík støða lættliga viðføra, at leiðarin fær somu „ónollur“ sum starvsfólkini, og tískil hevur ringt við at taka truplu samrøðurnar og avgerðirnar, sigur Hans Mourits Foldbo og heldur fram:

– Eisini vildi eg mett, at nýggi bygnaðurin gevur leiðarunum størri møguleikar at vera leiðarar, organisera uppgávurnar og leiða og fordeila arbeiðið. Avbjóðingin er at definera púra greitt, hvat hendir tá tú sum leiðari ikki ert har.

Hans Mourits Foldbo staðfestir vandan fyri at óformellar leiðslur stinga seg upp á arbeiðsplássum, har slíkar definitiónir mangla.

– So mást tú organisera teg burtur úr tí. Tað má og skal ein dugnalig leiðsla finna útav. Ger hon tað, so síggi eg tað ikki sum ein trupulleika, at ein og sami leiðari hevur ábyrgdina av fleiri stovnum, sigur Hans Mourits Foldbo.

## Málbar mál

Samstundis sum avbjóðingin við eini bygnaðarbroyting er stór, so kann eisini nógv gott spyrjast burturúr.

– Tað mugu vit ikki gloyma. Fæst til dømis størri fakligheit inn í arbeiðið við at skipa uppgávurnar øðrvísi, so er nógv vunnið, staðfestir Hans Mourits Foldbo.

Fyri sálarfrøðingin eru sonevndu succesupplivingarnar somuleiðis avgerandi faktorar.

– Set tær greið og ítøkilig mál. Lat tey vera spesifik og málbar, og arbeið so eftir teimum. Tá vilja susses-upplivingarnar geva íblástur og trivnað.





HEILSUGÓÐUR KOSTUR



*Tað er nógv meira umráðandi nú enn fyrr, at børn fáa heilsugóðan kost, tí vit hava í dag eitt heilt annað rørslumynstur, sum vit ikki høvdu trupulleikar av fyrr, og harafturat er nógv granskað og harvið nýggj vitan komin fram, sigur Snorri Patursson, kostfrøðingur*

# Ov nógv sukur

## ov lítið fullkorn og grønmeti

Orð: Tórfinn Smith

Samanumtikið fylgja føroysku dagstovnarnir ikki almennu tilráðingini, teimum átta kostráðunum. Sum heild nýta tey ov nógv sukur og ov lítið av fullkorni og grønmeti í gerandisdegnum. Tað staðfestir ein spurnakanning millum 21 dagstovnar kring alt landið, sum kostfrøðingarnir Snorri Patursson og Gyða í Gongini hava gjørt fyri Fólkaheilsuráðið. Við úrslitinum av kanningini staðfesta tey, at tað er stórur tørvur á at halda fram við arbeiðinum, so at allir almennir stovnar kring landið fáa ein felags leist til tess at tryggja børnunum heilsugóðan kost og umstøður at menna heilsugóðar matarvanar. Tey staðfesta samstundis, at á dagstovnunum er stórur tørvur á og áhugi fyri at fáa íblástur, kunnleika og førleika til at bjóða børnunum heilsugóðan kost á ein einfaldan og bíligan hátt.

Eina orsøk til, at dagstovnar ikki fylgja almennu kostráðunum, heldur Snorri vera eina blanding av tørvandi vitan, gomlum vanum, sum fólk hava ilt við at sleppa av við, tí okkum dámar best at gera tað, vit altíð hava gjørt, og raðfesting, og til tess krevst ein hugburðsbroyting. Men hann hevur vón um bata, tí starvsfólk á dagstovnunum sýntust at hava stóran áhuga fyri heilsubetri kosti og umstøðum. Snorri Patursson er ikki í iva um, hvør skal ganga á odda.

– Mín persónliga meining er, at bólturin liggur hjá almennu myndugleikunum, fyrst og fremst Heilsumálaráðnum og ongantíð



Snorri Patursson arbeiðir sum sjálvstøðugur kostfrøðingur. Heilsugóður kostur til børn er eitt av hansara hjartamálum. Umframt at kosturin er heilsugóður, hevur eisini rørsla ómetaliga nógv at siga.

Mynd: Rúni Friis Kjær

betur eisini við einum samstarvi við kommunalu myndugleikarnar. Teir tosa mangan um batar á trivnaðarøkinum, sum hetta júst er ein týðandi partur av. Í grannalondunum hava alt fleiri kommunur tikið táttin upp, og tað kundu vit eisini tikið til okkara, sigur Snorri.

### Best frá barnsbeini av

Kanningin av kostinum á dagstovnunum var endaspurturin á sonevnda kostárinum. Hetta varð gjørt, fyri at átøkini í árinum ikki bert endaðu í bláari luft, og so var alt aftur við tað gamla, sigur Snorri, sum er sera fegin um, at tey fóru undir hesa kostkanningina, sum greitt vísir, at her er veruliga nakað at fara eftir. Hann sigur, at eingin ivi er um, at grundarlagið undir matvanunum verður lagt frá barnsbeini av, og tí er ongantíð ov tíðliga at leggja góðar matvanar niður í tey yngstu, og tað er fyrst og fremst á tí økinum, at okkurt eigur at verða gjørt.

– Sjálvandi skulu vit eisini gera nakað á skúlum og arbeiðsplássum, tí har eru viðurskiftini heilt øðrvísi við stuttum frítøtum, eingum flógvum matpakka og kanska eini góðgætiskiosk sum næsta granna. Er grundarlagið tá ikki lagt bæði væl og virðiliga á dagstovninum, verða vánaligu vanarnir torførir at venda, sigur Snorri.

Snorri Patursson ger staðiliga vart við, at tað hevur ongantíð verið so víst sum nú, hvussu neyðugt tað er við heilsugóðum kosti, og heldur ongantíð neyðugari enn nú vit hava eitt heilt annað rørslumynstur. Tí høvdu vit áður ikki trupulleikar við. Harafturat er nógv granskað, og harvið nýggj vitan komin fram.

– Mannakroppurin er skaptur til rørslu, men tað tykist, sum vit í mongum førum hava gloymt tað.

Eingin orsøk er til at gera heilsugóðan kost á dagstovnunum til ein trupulleika at fáast við. Tú fært í dag til keyps eina ørgrynnu av øllum millum himmal og jørð, men ikki er neyðugt at gera tað meira tvørligt enn at halda seg til fullkornsbreyð, frukt og grønmeti, sigur Snorri, sum heldur, at tað skal gerast so einfalt sum gjørligt, tí annars tímir eingin at fáast við tað.



# Sólareygað borðreiðir við heilsugóðum kosti



Dagstovnurin Sólareygað leggur stóran dent á at børnini fáa heilsugóðan kost

Orð: Tórfinn Smith · Myndir: Sólareygað

– Her á Sólareyganum stremba vit eftir at kunna kallast ein sukurfríur stovnur. Tó kunnu vit ikki siga okkum vera ein gjøgnumført sukurfríur stovnur, tí tað kemur fyri at okkurt av tí, vit borðreiða við, hevur eitt dism av sukuri í. Men vit leggja okkum eftir at geva børnunum heilsugóðan kost. Heldur enn at geva børnunum fruktjogurt, so fáa tey naturel við skornari frukt. Og til bakstur brúka vit ikki fínamjøl, tað verið seg til breyð ella bollar, men heldur fullkornsmjøl. Tað sigur Mirjam Johannesen, dagstovnaleiðari, sum ásannar, at tað var í fyrstani ikki heilt sørt av avbjóðingum, tí tað er okkum meira ella minni íborið, at skulu vit hugna okkum, so hugsa vit at hava okkurt gott og leskiligt undir góman, okkurt søtt, men nú er tað eingin trupulleiki. Tað eru foreldrini eisini fegin um, hevur Mirjam varhugan av.

Um døgurðatíð eta børnini matpakkan, sum tey hava heimanífrá.

– Hvat er í matpakkanum, ráða foreldrini sjálvandi fyri, men vit mæla kortini til, at maturin er heilsugóður við nóg mikið av føðsluevnum, soleiðis at barnið fær tað, sum tað skal hava. Sama í sambandi við eitt nú føðingardagar, tá børn hava okkurt serligt við heimanífrá at bjóða, tá heita vit á foreldrini at hava okkurt heilsugott heldur enn køkur og góðgæti, sigur Mirjam, sum heldur, at børnini eru rættiliga tilvitað um at eta heilsugóðan mat. Hetta ger stovnurin vart við á heimasíðu og faldara, har tey hava ymiskar upplýsingar um stovnin, og hvørjum hann stendur fyri. Um kostin siga tey m.a.: *Matpakkin eigur at vera heilsugóður, og tískil er ikki ynskiligt at børnini fáa t.d. petit danoine, kindersnitte ella annað góðgæti í matpakkan. Øll børnini fáa mjólk og millummála frá stovninum.*

### Annar hugburður

Tilvitaði matpolitikkurin hjá Sólareyganum røkkur longur enn til dagliga millummálan. Hann ber somuleiðis brá av einum broyttum hugburði til vanahugsan á øðrum økjum. Eitt nú til vitjanina hjá jólamanninum, sum hvørki kemur við bommum ella pakka til øll, men ístaðin við eini leika-gávu til stovnin, sum øll børn kunnu fáa gleði av.

Mirjam sigur, at tey heldur vilja gera vitjanina av t.d. jólamanninum til eina uppliving, eina gávu í sær sjálvum, heldur enn at alt skal snúgva seg um ein keyptan pakka og søtmeti til hvønn einstakan. Ein góð uppliving smakkar eisini væl, og hon liggur væl og leingi á og hevur bert góð hjáárin.





*Jólamaðurin kemur hvørki við bommum ella gávum til hvønn einstakan, men ístaðin við eini leika-gávu til stovnin, sum øll børn kunnu fáa gleði av*













# Almikið gagn av køkshjálpini

*Carita Björklund er ikki í iva um, at samband er millum heilsugóðan kost og trivnað, menning og innlæring hjá børnum*



*Carita Björklund*

Orð: Tórfinn Smith

Carita hevur drúgvar roydnir á tí pedagogiska økinum, síðani hon nam sær útbúgving sum pedagogur í 1974. Hon starvaðist í mong ár á dagstovnum, harav nøkur ár sum leiðari. Í nøkur ár var hon forkvinna í Pedagogfelagnum, og hon er nú ráðgevi í dagstovnamálum hjá Vága kommunu. Carita hevur altíð verið ógvuliga medvitandi um týdningin av, at dagstovnar geva børnunum góðan kost. Fyrsta arbeiðspláss hennara eftir lokna útbúgving var á eini vøggustovu.

– Vit høvdu køkshjálp og løgdu okkum altíð eftir at geva børnunum á vøggustovuni góðan mat, sum vit søgdu. Tað varð gjørt, fyri at tey skuldu trívast og mennast og hava tað gott. Hvat vit skiltu við góðan mat, var helst meira eftir persónligari sannføring og royndum, og vit hugsaðu av góðum grundum ikki um tað, sum er vísindaliga prógvað sum heilsugóður kostur. So komu peningaliga trengri tíðir við skerjingum í kjalarvørrinum. Ofta var tað fyrsta, sum varð spart burtur, køkshjálpin, við tí úrsliti, at heldur enn at fáa heitan mat á stovninum, skuldu børnini nú hava matpakka við heimanífrá, og tað ávirkaði børnini, sum høvdu verið von at eta væl av grønmeti, eplum og fiski, sigur Carita, sum heldur tað vera stórt spell at missa køkshjálpina.

– Tá eg arbeiddi á Sóljugarði í Sandavági, vóru vit so heppin, at vit eitt skifti høvdu eina útbúna økonomu í køkinum, og hennara fakliga førleika nutu vit sanniliga gott av, og tað vóru foreldrini eisini sera fegin um. Eg veit um fleiri dagstovnar, eitt nú í Havn, sum hava fingið køkshjálp, men mær vitandi bert í sambandi við millummála. Tað er eisini gott, men best hevði eftir mínum tykki verið, at børnini fingu ein góðan døgurða á stovninum, heldur Carita.

## Finnlendingar góðar roydnir

Týdningin av, at dagstovnabørn, og fyri alt tað eisini skúlabørn, fáa heilsugóðan kost, fekk Carita eisini sjón fyri søgn, tá hon herfyri var eina námsferð í Finnlandi, har hon fekk høvi at vitja á fleiri dagstovnum og skúlum. Har høvdu tey ta skipan, at øll børn fingu heilsugóðan kost, bæði á dagstovni og í skúla, og hetta dámdi børnunum sera væl. Eitt var sjálvur maturin, annað var, hvussu og hvar tey borðreiddu. Har var hvørki køliskáp, matarroykur ella matleivdir á stovunum, har børnini hildu til, men tey kundu njóta matin í hugnaligum umhvørvi í eini stovu, tey høvdu til tað sama. Frá leiðarunum fekk Carita at vita, at børnini vóru sera væl fyri í allar mátar, og at tann heilsugóði kosturin var ein stór orsøk til tess.

Orsøkin til Finnlandsferðina hjá Caritu var kortini ikki at kanna matvanarnar, men at forvitnast, hví finnlendingar stóðu seg so væl í PISA-kanningunum.

– Jú, júst hetta við tí heilsugóða kostinum kann uttan iva vera ein avgerandi orsøk til, at børnini vóru so væl fyri, er Carita sannførd um.

## Politikarar áhugaðir

– Tað gerst alt vanligari í londunum uttan um okkum, at tey raðfesta heilsugóðan kost á dagstovnum ógvuliga frammarlaga, og tað er bara at vóna, at vit nú eisini fara at gera tað sama, og eg ivist ikki í, at tað eisini er ynski hjá flestu foreldrum, sigur Carita, sum heldur, at dagstovnaleiðarar eiga at venda sær til politiska myndugleikan, um hann ikki sjálvur tekur táttin upp av álvara. Carita veit at siga, at í Vága kommunu hava politikararnir tikið spurningin í størsta álvara, ikki minst eftir at so nógv fokus hevur verið á spurningin, nú vit hava havt eitt kostár, og í tí sambandi hevur hon, saman við politikarunum, verið og vitjað teir báðar dagstovnarnar í kommununi fyri at tosa við starvsfólkini har um tað, sum kom fram í kanningini av kostpolitikkinum hjá dagstovnum. At politikararnir sýna ítøkiligan áhuga hevur stóran týdning, og so er bert at vóna, at okkurt skilagott spyrst burturúr, vónar Carita Björklund, ráðgevi í dagstovnamálum hjá Vága kommunu.



# Hugburðurin er munandi broyttur

*Nú er sjáldsamt at síggja sjokulátaviðskera og súltutoy í matpakkunum. Heldur gularøtur og ymiskar fruktir, sigur leiðarin á Mylnuhúsinum í Klaksvík, sum í fleiri ár hevði góðar royndir av køkshjálp, sum tey av fíggjarligum ávum máttu gevast at hava*





*Maja Højsted, leiðari í Mylnuhúsinum, harmast um, at tey ikki kundu halda fram við køkshjálp í húsinum, tá fíggjarkarmurin frá kommununi hetta seinasta árið gjørdist ov trongur til, at stovnurin kundi varðveita hesa matskipan*





Orð: Tórfinn Smith · Myndir: Mylnuhúsið

Fyri nøkrum árum síðani fóru tey á dagstovninum Mylnuhúsinum í Klaksvík undir eitt nýtt átak, sum hevði til endamáls at geva børnunum á stovninum heilsugóðan kost og samstundis var ætlað sum eitt pedagogiskt átak. Millum annað skuldu børnini sjálv vera virkin í allari matgerð og tí, sum hartil hoyrir. Tað vísti seg tó, at hesin parturin av átakinum var bara so sum so, men tey hildu fram í nøkur ár við køkshjálpini, sum skipaði so fyri, at børnini fingu fjølbroyttan og heilsugóðan mat. Men í fjør bar ikki longur til, og køkshjálpin varð spard burtur.

Maja Højsted, leiðari í Mylnuhúsinum, harmast um, at tey ikki kundu halda fram við køkshjálp í húsinum, tá fíggjarkarmurin frá kommununi hetta seinasta árið gjørdist ov trongur til, at stovnurin kundi varðveita hesa matskipan. Tey vildu tó ikki sleppa endanum heilt, fyrr enn tey høvdu lagt spurningin fyri foreldrini. Umleið helmingurin av foreldrahópinum var fyri at halda fram. Spurningurin varð síðani lagdur fyri stýrið fyri stovnin, sum avgjørdi, at ráðiligast varð at gevast við matskipanini, tí hildið varð, at øll foreldur vóru ikki so væl fyri fíggjarliga, at tey kundu gjalda tær umleið 200 krónurnar eyka um mánaðin, sum skipanin hevði kostað.

## Fyrimunir og vansar

Maja Højsted ásannar, at bæði fyrimunir og vansar kunnu vera av, at dagstovnurin stendur fyri eini matskipan, heldur enn at børnini hava matpakka við heimanífrá.

– Hevði skipanin riggað soleiðis, sum stovnurin upprunaliga hevði ætlað, vóru fyrimunirnir eyðsýndir, bæði við uppliving og innlæring, eftirsum børnini vóru við í øllum, og við, at øll fingu heilsugóðan kost hvønn dag. Vansin kundi verið, at vit tóku ábyrgdina frá foreldrunum. Gjørdu vit tað øll árini, børnini vóru á dagstovni, kundi spurningurin verið, um foreldur tá fóru at smyrja matpakka, ella børnini kanska heldur fingu eina tjúgukrónu, so tey sjálv kundu keypa sær okkurt. Hesar og nógvar aðrar spurningar í hesum sambandi umrøddu tey nógv í Mylnuhúsinum, sigur dagstovnaleiðarin.

## Betri matpakkar

Maja Højsted, sum hevur arbeitt á dagstovnaøkinum í mong ár, sigur, at hóast innihaldið í matpakkunum, sum børnini koma við, kann vera rættiliga ymiskt, so er týðiligt at síggja ein munandi broyttan hugburð, tí ógvuliga sjáldan síggja tey sjokulátaviðskera og súltutoy á breyðflísunum, men heldur gularøtur og ymiskar fruktir. Tað var heldur ikki óvanligt at síggja sjokulátakeks ella heimabakaða køku til at hava omaná, men tað er eisini sjáldsamt nú. Samanumtikið heldur Maja, at hugburðurin og tilvitanin til heilsugóðan kost er munandi broyttur, men kann uttan iva gerast enn betri. Hon samanber við viðurskiftini í Noregi, har hon arbeiddi á dagstovni í tvey ár. Tey vóru sera tilvitað um heilsugóðan kost. Annað kom ikki fyri.

Dagstovnaleiðarin í Mylnuhúsinum sigur, at enn meira upplýsing er leiðin fram, soleiðis at fólk gerast alt meira tilvitað um, hvat er heilsugott, og hvussu stóran týdning tað hevur. Ein týðandi partur í so máta, ikki minst mótvegis børnunum, er at gera heilsugóða kostin spennandi og áhugaverdan. At skipa fyri viðkomandi skeiðum fyri dagstovnafólk heldur Maja hevði verið eitt skilagott átak á leiðini.

# Foreldrini hava ábyrgdina

*Hóast børn flest eru á dagstovni stóran part av degnum, eru tað fyrst og fremst foreldrini, sum hava ábyrgdina av, at børnini fáa heilsugóðan kost. Men sjálvandi eiga eisini dagstovnarnir at gera sítt í so máta*

Orð: Tórfinn Smith



*– Vit eiga at virka fyri eini hugburðsbroyting úti í heimunum, sigur Karstin Hansen*

Tað sigur Karstin Hansen, landsstýrismaður við heilsumálum, í sambandi við úrslitið av eini kanning av, í hvønn mun børn á dagstovnum fáa heilsugóðan kost. Kanningin hevur víst, at føroysku dagstovnarir fylgja ikki almennu tilráðingini við teimum átta kostráðunum. Við støði í úrslitinum av kanningini staðfesta Snorri Patursson og Gyða í Gongini, kostfrøðingar, sum gjørdu kanningina, at stórur trøvur er á halda fram við arbeiðinum, so allir almennu stovnarnir kring landið fáa ein felags leist til tess at tryggja børnunum heilsugóðan kost. Í viðtalu við Snorra Patursson sigur hann, at hansara persónliga meining er, at bólturin liggur hjá almennu myndugleikunum, fyrst og fremst hjá Heilsumálaráðnum.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum sigur seg ikki vera heilt samdan í, hvør hevur ábyrgdina av, at børnini fáa heilsugóðan kost. Tað hava fyrst og fremst foreldrini.

– Tey børn, sum eru á dagstovni, eru har bert part av degnum, og fyri alt tað bert ein lítlan part av lívinum, og sama tá tey fara í skúla, og so eru tey heima aftur, har uppalingin fyrst og fremst liggur. Tí er at virka fyri eini hugburðsbroyting úti í heimunum. Tað skal ikki gerast við at lóggeva, men saman við Mentamálaráðnum eigur Heilsumálaráðið at gera nakrar leiðbeiningar, sigur Karstin Hansen, sum vísir á, at stovnar sum Fólkaheilsuráðið og Gigni kunnu ivaleyst leggja enn størri dent á at fáa sín boðskap um heilsugóðan kost fram. Hesin boðskapur skal fyrst og fremst rættast til heimini, sigur hann.

Spurdur, um tað ikki ørkymlar landsstýrismannin, at dagstovnar ikki fylgja almennum kostráðum, ásannar Karstin Hansen, at tað er ikki nóg gott nokk. Jú, dagstovnarnir eigi sjálvandi eisini at vera medvitandi um tann kost, tey borðreiða fyri børnunum, men landsstýrismaðurin leggur tó staðiliga dent á, at ábyrgdin liggur úti í hvørjum einstøkum heimi.





Tú, eg & sushi



etika

Áarvegur 3 319 319 etika@etika.fo etika.fo



*Nógv ymisk arbeiðspláss vóru umboðað, og soleiðis komu mong ymisk áhugaverd evni fram og vístu veruliga, hvussu fjøltáttað, dygdargott og víttfevnandi pedagogiska fakið er, sigur Birgit Debess, ið arbeiðir sum ráðgevingarleiðari á barna- og ungdómsdeildini hjá Tórshavnar kommunu*

# Fakfagnaðurin

## Har ymiskleikin veruliga kom til sjóndar

Orð: Tórfinn Smith · Myndir: Jógvan Olsen

Eitt av mongum tiltøkum, sum Pedagogfelagið skipaði fyri í sambandi við, at felagið í fjør hevði 30 ár á baki, var sonevndi 30 ára fagnaðurin, sum varð hildin á Hotel Føroyum 9. og 10. november, har nógvir limir tóku lut. Dagarnir eydnaðust sera væl, og eftir stóð júst tað, sum felagið vildi við tiltakinum: at lýsa bitar av pedagogiskum virksemi í smáum verkstovum, sum tilsamans skapa eitt stórt, fjølbroytt og litríkt klútateppi, soleiðis sum felagið frammanundan lýsti tiltakið.

Ein av fyriskiparunum var Birgit Debess. Hon letur væl at og minnist aftur á tveir góðar og kveikjandi dagar við nógvum sera áhugaverdum framløgum, sum veruliga lýstu fjølbroytta námsfrøðiliga landslagið.

Skipað varð soleiðis fyri, at tveir gestarøðarar løgdu fyri. Teir vóru Jóhannes Miðskarð, sum hugleiddi um avbjóðingar á pedagogiska økinum, og Rógvi Thomsen, sum kallaði fyrilestur sín: Tú upphavsins lív – børn og ung sum javnbjóðis medspælarar í pedagogiskum og sosialum arbeiði.

Eftir hetta varð skipað fyri ymiskum verkstovum, har luttakarar greiddu hvør frá sínum evni, pedagogikki ella arbeiðsplássi, og nógvar eldhugaðar framløgur vóru. Av tí, at so nógv ymisk arbeiðsøki vóru umboðað, komu mong ymisk áhugaverd evni fram og vístu veruliga, hvussu fjøltáttað, dygdargott og víttfevnandi pedagogiska fakið er.

### Næstu ferð alment

Tá tey í Pedagogfelagnum fóru undir fyrireikingarnar av Fakfestivalinum, umhugsaðu tey tann møguleikan, at hann eisini skuldi vera opin fyri øðrum enn limum, men nú var hetta tiltakið í sambandi við felagsins egna føðingardag, og harafturat eru tey so mikið fjølment, at pláss var ikki fyri øðrum. Men fara tey aftur undir eitt tílíkt tiltak, heldur Birgit, at tað kundi verið eitt hugskot eisini at boðið øðrum fakbólkum við.

Hon vísir til eitt líknandi tiltak, sum sálarfrøðingarnir skipa fyri, har aðrir fakbólkar vóru bodnir at luttaka, og tað riggaði sera væl, men sálarfrøðingarnir eru munandi færri í tali, skal sigast.

– Eg vildi hildi tað verið gagnligt at fingið aðrar fakbólkar við til eitt tílíkt tiltak, tí vit vilja fegin varpa meira ljós á pedagogiska økið, soleiðis at eisini onnur fáa betri innlit í, hvat pedagogiska økið ber í sær, sigur Birgit sum hevur varhugan av, at ikki allir fakbólkar hava nóg nógv innlit í ella fatan av tí arbeiði, pedagogarnir gera.

– Vit uppliva okkum viðhvørt standa eitt sindur í skugganum av eitt nú lærarum og sjúkrarøktarfrøðingum, og tað er torført at skilja, tí vit halda okkum hava minst líka góðar førleikar sum fleiri aðrir fakbólkar, sigur Birgit, sum heldur, at tað avgjørt hevði givið meining hjá øðrum fakbólkum at hoyrt tær nógvu spennandi framløgurnar, sum vóru á fakfagnaðinum.

### Styrktur samleiki

Samanumtikið heldur Birgit, at tiltakið var sera væleydnað, og at luttakararnir fingu nakað í viðførið heim við sær.

– Eitt tílíkt tiltak styrkir okkara egna samleika bæði inneftir og úteftir, og tað var ikki minst gevandi, at pedagogar, sum virka á mongum ymiskum pallum, hoyra um arbeiði, arbeiðspláss og royndir hvør hjá øðrum, sigur Birgit Debess.













































# Lettland ynskir dagstovnasamstarv

*Hevur nakar føroyskur dagstovnur áhuga í at samstarva við dagstovn í Lettlandi, er møguleikin her, og fíggjarligu stuðulsmøguleikarnir eru góðir*

Orð: Tórfinn Smith

Altjóða Skrivstovan hevur fingið fyrispurning frá einum dagstovni í Lettlandi, sum fegin vil hava samband við føroyskan dagstovn at samstarva við. Dagstovnurin við 150 børnum millum 1½ og 6 ára aldur eitur „Karliena“ og er í býnum Valmiera í landnyrðingspartinum av Lettlandi.

Í skrivinum greiða tey frá, at endamálið við stovninum er at skipa og seta í verk serkøna og dygdargóða læring, har børnini læra grundleggjandi førleikar, sum eru neyðugir í tí persónliga og sosiala lívinum. Í fleiri ár hava tey lagt stóran dent á at hava ein heilsugóðan og tryggan lívsstíl á stovninum, og tey gera nógv burtur úr, at børnini fáa heilsugóðan mat. Uttan um barnagarðin er eitt sera vælhildið náttúruøki, sum tey eru nógv úti í, og sum eisini er í samsvari við tað miðvísa kreativa arbeiðið og stavnhaldið hjá teimum.

Raimonda Liepina, sum er verkætlanarsamskipari fyri lettiska barnagarðin, greiðir frá, at tey fegin vilja hava samband við ein føroyskan stovn at samstarva við í Nordplus 2013. Tey hava í fleiri ár tikið lut í ymiskum verkætlanum í heimlandinum, og nú halda tey, at tíðin er komin at taka lut í eini altjóða verkætlan.

– Vit hava royndir, ið vit ynskja at samskifta við onnur um, og soleiðis fáa nýggj og áhugaverd hugskot sum kann tæna bæði okkum og okkara samstarvsparti, siga tey í skrivinum.

## Góðir stuðulsmøguleikar

Holger Arnbjerg, leiðari á Altjóða Skrivstovuni, sigur, at tað er ikki at halda seg aftur at bjóða lettlendingum samstarv. Er onkur dagstovnaleiðari ella pedagogar annars á onkrum stovni, sum hevur hug at taka upp samstarv við lettiska dagstovnin og fara eina kunningarferð hagar, hava tey møguleika til at søkja fíggjarligan stuðul til ferð og uppihald frá Nordplus junior. Men tað ræður um at bera skjótt at, tí freistin at søkja stuðul er 1. mars. Fyri at frætta meira um lettiska dagstovnin og ætlanir teirra, kunnu áhugað venda sær beinleiðis til lettiska samskiparan: raimondaa@inbox.lv. Somuleiðis ber til at venda sær til Altjóða Skrivstovuna: ask@setur.fo, sum fegin vegleiðir m.a. um stuðulsmøguleikarnar. www.setur.fo/ask/nordplus

## Styrkja samstarv

Ætlanin við Nordplusskipanunum er, at tær skulu styrkja norðurlendska-baltiska felagsskapin og samleikan við støði í søguligu, mentanarligu demokratisku felagseyðkennunum hjá londunum. Skipanirnar eru ætlaðar til undirvísing á øllum stigum. Norðurlendska Ráðharraráðið hevur í tíðarskeiðnum 2012 til 2015 sett í verk fimm Nordplus skipanir, sum eru ætlaðar at økja um samstarv og mobilitet á útbúgvingarøkinum. Ein av hesum skipanunum er Nordplus Junior, sum er ætlað lærarum og næmingum í fólkaskúlunum, miðnámsskúlunum og innan yrkisútbúgvingar. Við í hesar verkætlanir er nú eisini dagstovnaøkið komið. Skipanin er galdandi fyri Danmark, Finnland, Svøríki, Noregi, Ísland, Føroyar, Grønland og Álandsoyggjarnar. Nú eru eisini Baltisku londini, Estland, Lettland og Litava, komin við í hetta samstarv.

## Góðir stuðulsmøguleikar

Nú eisini dagstovnaøkið er komið við í hetta norðurlendska samstarvið, gevur tað teimum, sum starvast á hesum øki, góðar møguleikar at samskifta sínámillum og kunna seg um, hvat fyriferst á økinum uttan um okkum. Holger Arnbjerg, leiðari á Altjóða Skrivstovuni, sigur, at fíggjarligu stuðulsmøguleikarnir eru sera góðir at fremja hetta samstarv í verki. Ikki minst innan Nordplus Junior. Í hesum førinum er ein fyrispurningur komin frá einum dagstovni í Lettlandi um samstarv, og hevur onkur, sum arbeiðir á dagstovnaøkinum í Føroyum, hug at fara eina kunningarferð til Lettlands, kann søkjast um stuðul frá Nordplus Junior, sum kann rinda fyri bæði ferð og uppihald. Einasta, sum møguliga kostar, eru teir dagar, viðkomandi er burtur frá dagliga arbeiðinum.

## Avbjóðandi samstarv við Baltisku londini

– Tað eru ivaleyst fólk, sum enn í ávísan mun hava fordómar um, hvussu vorðið er handan gamla jarntjaldið, hóast fleiri enn tjúgu ár eru, síðani múrurin rapaði. Har hendir mangt og hvat spennandi. Tey eru á fleiri økjum við í ES-samstarvi eins og í norðurlendskum samstarvi, m.a. í útbúgvingarhøpi hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum, sigur Holger Arnbjerg, sum heldur, at vit hava nógv at læra av teimum og tey av okkum. Ikki minst, tí tey framvegis eru eitt sindur fremmand fyri okkum, kann eitt slíkt samstarv gerast upp aftur meira spennandi.

Leiðarin á Altjóða Skrivstovuni sigur, at vit hava higartil ikki havt so mong dømi um samstarv við Baltisku londini í Nordplus høpi, og hann mælir staðiliga til, at føroyingar taka av eini tílíkari umbøn um samstarv sum hesari á dagstovnaøkinum.







# Kom til kundaprát í Eik

**– so svara vit tínum spurningum**

Í Eik fært tú persónliga ráðgeving um peningaviðurskiftini hjá tær og familju tíni. Við serligu viftuni fara vit ígjøgnum ymisk viðurskifti, har vit ráðgeva tær - uttan mun til hvar í lívinum tú ert, og hvønn fíggjartørv, tú hevur. Vit kunnu fara um alla viftuna, ella bara júst tað blaðið, tú hevur tørv á.

Bílegg eitt kundaprát á heimasíðu okkara ella á tel. 348 000, og fá betri yvirlit yvir títt fíggjarlív.



**Les meira á www.eik.fo um hvussu tú brúkar okkum best.**




# Fá alt við

## - líkamikið hvar tú ert

**Teldil**

# 1 GB

**íroknað nýtsla.**
0,30 Kr/MB útyvir

## Kr. 150 /mðn.

Við einum datapakka fært tú trygd fyri at tú kanst fylgja við tíni nýtslu. Vit senda tær eini kunnandi smsboð, tá tú hevur brúkt 80% av tíni íroknaðu nýtslu og aftur tá tú ert farin uppum tey 100%. Datapakkar eru bert galdandi fyri nýtslu í Føroyum.

**Við einum datapakka kanst tú nýta internetið eins og tú plagar, tá tú til dømis fert í summarhúsið. Tú fært alt við uttan at skula stúra fyri óvæntaðum stórum rokningum, tí vit hava datapakkan júst til tína nýtslu.**

| Íroknað nýtsla | Kostnaður | Ferð upp til | Kr/MB útyvir |
|---|---|---|---|
| 300 MB | 100 kr /mðn. | 3 mb/sek | 0,50 kr. |
| 1 GB | 150 kr /mðn. | 3 mb/sek | 0,30 kr |
| 3 GB | 300 kr /mðn. | 5 mb/sek | 0,20 kr |

**Hevur tú ikki datapakka, kostar eitt MB 6 kr., so her kann vera nógv at spara.**

**Ring 80 80 80, vitja www.ft.fo ella kom inn í Telebúðina**
í Telebúðini vegleiða vit teg fegin í øllum tínum telespurningum. Vælkomin í tína Telebúð

FØROYATELE